LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 28. mai 2015
J.Nr.: LUM-30- 15/00060-24
(at tilskila í svari)

# Frágreiðing

# um

# viðgerð av málum um alment innlit í aðalráðunum

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur s. 3

2. Samanumtøka s. 5

3. Um reglurnar í innlitslógini s. 8

4. Mál um innlit, viðgjørd av aðalráðunum

Fiskimálaráðið s. 12

Mentamálaráðið s. 21

Vinnumálaráðið s. 30

Fíggjarmálaráðið s. 34

Almannamálaráðið s. 41

Heilsumálaráðið s. 49

Løgmansskrivstovan s. 55

# 1. Inngangur

Við skrivi, dagfest 2. mai 2013, boðaði eg Løgmansskrivstovuni, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Innlendismálaráðnum, Vinnumálaráðnum, Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Mentamálaráðnum frá, at eg hevði gjørt av at kanna viðgerðina av málum um innlit eftir innlitslógini hjá øllum aðalráðunum.

Sambært umboðsmanslógini kann umboðsmaðurin sjálvur taka mál til viðgerðar og í tí sambandinum fremja neyðugar kanningar, jbr. § 6, stk. 5 (nú § 6, stk. 6). Myndugleikar hava í hesum sambandi skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum umboðsmaðurin krevur at fáa fyrilagt, jbr. § 8, stk. 1.

Eg heitti á aðalráðini um at læna mær 10 tey seinast avgreiddu málini, har søkt var um innlit í mál hjá myndugleikanum eftir innlitslógini, ella mál, sum myndugleikin hevði viðgjørt sum kærumyndugleiki, har stovnur undir myndugleikanum heilt ella partvís hevði sýtt at veita innlit. Mál, sum vóru ella høvdu verið klagað til mín, fóru ikki at verða tikin við í viðgerðina. Biðið var harumframt um øll skjølini viðvíkjandi málunum, umframt eitt journalyvirlit yvir skjølini í teimum einstøku málunum.

Um miðjan mai 2013 var eg saman við einum ráðgeva á fundi við øll aðalráðini hvør í sínum lagi til tess at umrøða kanningina.

Eg kunnaði um, at endamálið var ikki at leita eftir smáfeilum í einstøku málunum, men heldur at fáa eina heildarmynd av viðgerðini hjá aðalráðunum av innlitsáheitanum og finna fram til møguligar skipanarligar feilir og møguligar óhepnar mannagongdir.

Á fundunum gjørdist skjótt greitt, at flestu aðalráð høvdu svarað játtandi uppá seinastu 10 avgreiddu innlitsáheitanirnar. Aðalráðini vórðu tí biðin um eisini at lata mær 5 tey seinast málini, har aðalráðið heilt ella partvís hevði sýtt at lata innlit.

Upplýst varð, at ætlanin var at savna viðgerðina av málunum í eina frágreiðing, og at myndugleikarnir fóru at fáa eina fyribilsútgávu til viðmerkingar, áðrenn frágreiðingin varð gjørd liðug og almannakunngjørd.

Ein fyribilsútgáva av frágreiðingini varð tann 24. mars 2015 send aðalráðunum til viðmerkingar. Í tann mun eg havi tikið viðmerkingar hjá aðalráðunum til eftirtektar, eru hesar innarbeiddar í frágreiðingina. Í øðrum førum havi eg endurgivið sjónarmiðini hjá aðalráðunum og gjørt viðmerkingar til málsviðgerðina undir einstaka málinum.

Innlendismálaráðið varð niðurlagt í oktober mánaða 2013, og av tí at eingin ábyrgdarhavandi er at svara fyri viðgerðini av hesum málunum, havi eg gjørt av ikki at viðgera málini, sum eg fekk til gjøgnumgongd frá táverandi Innlendismálaráðnum.

Flestu málini í kanningini eru umrødd og endugivin í navnleysum líki.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

# 2. Samanumtøka

Eg havi gjøgnumgingið íalt 87 mál hjá Fiskimálaráðnum, Mentamálaráðnum, Vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Løgmansskrivstovuni.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu nógv mál hjá einstøku aðalráðunum eru viðgjørd. Í onkrum føri var okkurt av málunum, sum umboðsmaðurin fekk, frammanundan viðgjørt sum klagumál hjá umboðsmanninum, okkurt annað er lagt burturúr, tí málið snúði seg ikki um innlit sambært innlitslógini, og einstøk mál hava verið mett at vera ov gomul at viðgera.

Flestu málini eru viðgjørd av aðalráðunum í 2012 ella 2013. Tó eru einstøk mál, sum eru væl eldri. Sambært aðalráðunum kemst hetta av, at neyðugt hevur verið at leita fleiri ár aftur í tíðina fyri yvirhøvur at finna mál, har myndugleikin heilt ella partvís hevur sýtt at geva innlit.

Yvirhøvur er málsviðgerðartíðin stutt. Í flestu førum bert nakrar fáar dagar, og burtursæð frá nøkrum undantøkum (mál 35, 46, 65 og 70) , eru innlitsáheitaninar svaraðar, og í mangum føri eisini avgreiddar, innan 10 daga freistina.

Í teimum førum, aðalráðið ikki hevur verið rætti myndugleiki at viðgera innlitsáheitaninar, er borið skjótt at, og áheitanin er send víðari til rætta myndugleika at viðgera.

Flestu innlitsáheitaninar eru frá journalistum, og burtursæð frá onkrum einstakum føri, verður samskift um teldupost ella telefon. Hevur talan verið um at veita innlit í nógv skjøl, er hetta í onkrum føri avritað og sent við vanligum posti. Bert í einum føri hevur eitt aðalráð sent rokning fyri at lata innlit. Í ítøkiliga førinum var talan um at avrita omanfyri 500 skjøl.

Allar innlitsáheitaninar eru skrásettar í sjálvstøðug mál. Hetta ger tað lætt at leita málini fram, og er hetta eisini ein týðandi fortreyt fyri at kunna gera eina slíka kanning sum hesa hjá umboðsmanninum.

Í sambandi við gjøgnumgongdina av málunum í hesi kanning havi eg í fleiri førum lagt til merkis, at tó at tað framgongur av málinum, at viðkomandi ikki fær fult innlit, so framgongur tað ikki av málunum, hvørji skjøl ella upplýsingar, myndugleikin hevur sýtt fyri at lata innlit í, umframt at hetta heldur ikki er gjørt greitt yvirfyri viðkomandi. Í øðrum førum havi eg lagt til merkis, at málini eru avgreidd á ein slíkan hátt, at tað ber ikki til at siga, um myndugleikin hevur givið innlit í øll skjølini í málinum, ella um nøkur skjøl ella upplýsingar eru undantiknar.

Eitt mál, har søkt verður um innlit eftir innlitslógini, er eitt vanligt fyrisitingarmál, og reglurnar í fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina av málinum. Gevur ein myndugleiki ikki innlit í øll tey skjøl ella upplýsingar, sum søkt verður um innlit í, er talan um eina avgerð, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti, og sambært fyrisitingarlógini hevur myndugleikin í einum slíkum føri skyldu til at grundgeva fyri sínari avgerð. Hetta inniber, at myndugleikin skal greiða frá, at innlit verður ikki givið í skjøl ella upplýsingar, eins og greiðast skal frá orsøkini til hetta.

Her er talan um grundleggjandi og týðandi tættir, sum vanta í málsviðgerðini. Harumframt skal verða víst á, at tað hevur stóran týdning fyri borgaran ella journalistin, tá gerast skal av, um ein avgerð skal kærast ella klagast, hvør grundgevingin er fyri, at avgerðin ikki til fulnar gekk viðkomandi á møti, eins og tað er av avgerandi týdningi, at myndugleikin í sambandi við eina møguliga kæru- ella klaguviðgerð kann skjalprógva viðgerðina av málinum. Vísast kann m.a. til mál 29, 37, 43, 44 og 50.

Tað er ikki grundarlag fyri at gera generellar niðurstøður um umsitingina grundað á feilir, sum koma fyri í einstøkum førum, men eg haldi orsøk vera til at varpa ljós á, at myndugleikar í tveimum førum hava latið innlit í upplýsingar, sum eftir § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini eru at meta sum eymar upplýsingar um privat viðurskifti hjá einstaklingum, og sum ikki eru fevndar av rættinum til innlit (mál 43 og 71).

Í einum máli ber til at lesa upplýsingar um privat viðurskifti, sum vóru undantiknar innliti eftir § 12, stk. 1, nr. 1, hóast myndugleikin hevði strikað upplýsingarnar (mál 89).

Í tveimum førum eri eg ósamd við myndugleikar um undantøku av skjølum og upplýsingum. Víst verður til mál 51 hjá Vinnumálaráðnum um innlit í upplýsingar í einum telefonnotati og mál 116 hjá Løgmansskrivstovuni um heimildina at sýta innlit í málið um limaskap í WTO.

Hvat viðvíkur spurninginum um at geva meirinnlit ber ikki til at gera eina generella niðurstøðu um, hvussu aðalráðini umsita hesa reglu. Í onkrum føri verður innlit latið í øll skjølini í einum máli, uttan at spurningurin sæst at hava verið viðgjørdur sjálvstøðugt, og hóast fleiri av skjølunum kunnu undantakast sambært lógini. Í øðrum førum verður viðmerkt, at innlit verður latið í skjøl eftir regluni um meirinnlit. Dømi eru eisini um, at myndugleikin sýtir fyri eftir áheitan at lata meirinnlit. Staðfestast kann tó, at aðalráðini í fleiri førum hava givið innlit eftir regluni í meirinnlit við t.d. at geva innlit í m.a. mál um lóggávu, hóast lógaruppskotið ikki er lagt fram í Løgtinginum, og í upprit til landsstýrisfund og innanhýsis skjøl, sum í útgangsstøðinum eru undantikin rættinum til innlit. Vísast kann m.a. til mál 37, 38, 69, 88, 95, 99, 110 og 117.

Um viðgerðina av einstøku málunum verður víst til viðmerkingar mínar undir einstaka málinum.

# 3. Um reglurnar í innlitslógini

Í hesum parti verður greitt frá ásetingunum í lógini um alment innlit. Undir viðgerðini av einstøku málunum í frágreiðingini eru fleiri av ásetinginum í lógini og aðrar spurningar viðgjørdir nærri.

Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) kom í gildi 1. januar 1994.

Lógin er galdandi fyri alt virksemið hjá almennu fyrisitingini, tað vil siga, bæði tá almennir myndugleikar taka avgerðir, tá almennir myndugleikar útinna tænastuvirksemi (faktiska fyrisiting) sum t.d. viðgerð á sjúkrahúsi ella undirvísing, og tá almennir myndugleikar fremja eginrættarligar gerðir sum t.d. gera sáttmála um keyp av telduútbúnaði, jbr. § 1, stk. 1.

Rætturin til innlit er tó treytaður av, at skjølini, sum biðið verður um innlit í, eru móttikin ella gjørd sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans, jbr. § 4, stk. 1.

Við heimild í innlitslógini kann ein og hvør, eisini í førum har tey ikki eru partur av einum máli, krevja at fáa høvi at gera seg kunnugan við skjøl, jbr. § 4, stk. 1, 1. pkt., og sambært stk. 3 skal viðkomandi skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við.

Sjálvt málið um innlit er eitt mál, har avgerð fer at verða tikin, og tann, sum biður um innlit, er partur í hesum málinum. Reglurnar í fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina av einum innlitsmáli, herundir t.d. eisini reglurnar um ógegni.

*Lógarbygnaðurin*
Inngangandi er ásett, at ein og hvør hevur rætt til skjalainnlit. Síðani verða nevnd tey mál, sum ikki ella bert partvís eru fevnd av rættinum til innlit. Í aðru atløgu verða nevnd tey skjøl, sum í útgangsstøðinum ikki eru fevnd av rættinum til innlit, og í triðju atløgu verða nevndar upplýsingar, sum kunnu undantakast rættinum til innlit. Lógin hevur at enda eisini ásetingar um málsviðgerðina av innlitsáheitanum.

*Høvuðsreglan*

Høvuðsreglan er, at tann, sum biður um innlit, hevur rætt til innlit í øll skjøl, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit, t.v.s. at onnur áseting í lógini skal heimila, at skjøl ella upplýsingar verða undantikin innliti, jbr. § 4, stk. 1, 1. pkt. Rætturin fevnir um innlit í skjøl, sum myndugleikin hevur gjørt ella hevur móttikið. Ein myndugleiki hevur ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl í sambandi við viðgerðina av eini innlitsáheitan.

Lógin er ein sokallað minimumslóg, og hetta merkir, at lógin bert viðger, nær ein myndugleiki hevur skyldu at lata innlit. Lógin forðar ikki myndugleikunum í at geva einum borgara ella fjølmiðli innlit í størri mun (meirinnlit), um ikki aðrar reglur, sum t.d. reglurnar um tagnarskyldu, eru ein forðing fyri hesum, jbr. § 4, stk. 1, 2. pkt.

*Undantøka av málum*

Mál um setan í starv ella flytan í hægri starv verða ongantíð fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 2, stk. 1.

Høvuðsorsøkin til hetta undantak er, at skulu almennir myndugleikar fáa best skikkaðu umsøkjararnar, er neyðugt at verja umsøkjarar ímóti, at onnur, sum t.d. verandi arbeiðsgevarin hjá viðkomandi, fáa at vita, at viðkomandi søkir annað starv. Lógin er annars galdandi fyri mál um starvsfólk hjá tí almenna, t.d. agamál og uppsagnarmál.

Mál um lóggávu, herundir játtanarlógir, koma bert undir lógina og verða fevnd av rættinum til innlit, tá lógaruppskotið er lagt fram í Løgtinginum, jbr. § 2, stk. 2. Verður eitt lógaruppskot ikki lagt fram í Løgtinginum, verður tað ongantíð fevnt av rættinum til innlit. Ásetingin fevnir bert um lógaruppskot og t.d. ikki um uppskot til kunngerðir.

*Undantøka av skjølum*

Sambært § 7 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Hetta eru til dømis skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu so sum notatir og frágreiðingar, og brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika.

Hóast eitt skjal er at meta sum eitt innanhýsis skjal, sum ikki er fevnt av rættinum til innlit, skal myndugleikin meta um, hvørt skjalið inniheldur upplýsingar, ið innlit

eigur at verða givið í sambært § 11 í innlitslógini (ekstrahering). Hetta eru upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið.

Verður eitt innanhýsis skjal latið øðrum uttanfyri standandi, er skjalið ikki at meta sum eitt innanhýsis skjal longur og verður fevnt av rættinum til innlit.

Í § 8 er ásett, at ávís innanhýsis skjøl kortini eru fevnd av rættinum til innlit.

Sambært § 10 fevnir rætturin til innlit ikki um ávís onnur skjøl, herundir gerðabøkur hjá landsstýrinum, frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn og skjøl, ið verða gjørd av einum myndugleika til nýtslu á sovorðnum fundum.

*Undantøka av upplýsingum*

Sambært § 12 fevnir rætturin til innlit ikki um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum, og endamálið við hesum er at tryggja friðin um privatlívið.

Tað sama er við upplýsingum um tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella tað virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.

Eftir § 13, stk. 1 kunnu upplýsingar undantakast almennum innliti grundað á almenn áhugamál. Tað snýr seg um trygd ella verju ríkisins, uttanríkispolitisk áhugamál, atlit til at at søkja at lógarbrotum, alment eftirlitsvirksemi, ávís almenn fíggjarlig áhugamál, umframt avís serlig almenn áhugamál.

Um bert ein partur av einum skjali kemur undir ásetingarnar í § 12, stk. 1 og 2 og § 13, stk. 1, skal umsøkjarin verða kunnaður við restina av skjalinum.

*Reglur um málsviðgerð av innlitsmálum*

Mál um innlit eru vanlig fyrisitingarlig mál, sum eru fevnd av reglunum í fyrisitingarlógini, sum t.d. reglunum um ógegni, grundgeving, vegleiðing v.m. Fyri málsviðgerðina av tílíkum málum galda eisini vanligu fyrisitingarrættarligu reglurnar um at upplýsa málið, reglurnar um skráseting v.m.

Aftrat hesum reglum eru í innlitslógini ásettar serligar reglur um málsviðgerðina av innlitsáheitanum.

Tá biðið verður um innlit í eitt avgerðarmál, er tað sambært § 15, stk. 1 í innlitslógini tann myndugleikin, sum skal taka avgerð í málinum, sum skal taka støðu til innlitsspurningin. Er talan um mál, har eingin avgerð skal takast, er tað tann myndugleikin, sum hevur skjalið um hendi.
Avgerðir um skjalainnlit kunnu sambært § 15, stk. 2 kærast serstakt til tann myndugleika, ið er kærustovnur í mun til avgerðina í málinum, sum áheitanin um skjalainnlit viðvíkur.

Viðkomandi myndugleiki skal sambært § 16, stk. 1 sum skjótast gera av, um áheitanin um skjalainnlit kann verða gingin á møti. Er áheitanin ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur fingið hana, skal myndugleikin boða frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð væntandi fer at verða tikin, jbr. § 16, stk. 2.

Tað er somuleiðis viðkomandi myndugleiki, sum ger av, um hann/hon, sum er komin við áheitanini, skal verða gjørdur kunnigur við skjølini á tann hátt, at hann fær høvi til at hyggja ígjøgnum skjølini ella fær avrit av skjølunum.

*Gjald*
Sambært kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 kann ein myndugleiki krevja gjald fyri avrit av skjølum í einum máli, sum verða latin sambært innlitslógini. Gjaldið kann bert krevjast, tá myndugleikin hevur fingið eina greiða áheitan um at útflýggja avrit av skjølunum.

# 4. Mál um innlit, viðgjørd av aðalráðunum

## Fiskimálaráðið

Mál nr. 18

Sambært innanhýsis telduposti tann 13. mars 2013 hevur eitt fakfelag biðið um at fáa avrit av fiskiloyvunum hjá trimum ávísum skipum til ávísan fiskiskap í einum ávísum tíðarskeiði. Tann 18. mars sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvini við telduposti.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 19

Tann 18. mars 2013 verður biðið um innlit í skjal 2 í máli, sum hevur málsnummar XX. Sambært skjølunum í málinum er talan um svar frá Fiskimálaráðnum til Landsstýrismálanevndina í einum kærumáli. Sama dag verður skjalið sent viðkomandi.

***Onga viðmerking***.

Mál nr. 20

Tann 14. apríl 2013 biður journalistur um innlit í viðgerðina hjá Fiskivinnuráðnum av uppskotinum til kunngerð um veiði eftir toski á Flemish Kap í 2013. Dagin eftir verður frágreiðing frá fundi í Fiskivinnuráðnum tann 5. apríl 2013 send journalistinum.

***Onga viðmerking, sí tó mál nr. 22.***

Mál nr. 21

Sambært telduposti tann 5. apríl 2013 hevur journalistur um telefon biðið um innlit í málini, sum Fiskivinnuráðið hevði viðgjørt sama dag, og viðgerðina hjá Fiskivinnuráðnum. Sama dag sendir Fiskimálaráðið journalistinum tilfarið, sum varð viðgjørt á fundinum, og frágreiðing frá fundinum.

***Onga viðmerking, sí tó mál nr. 22.***

Mál nr. 22

Sambært telduposti 23. apríl 2013 hevur journalistur um telefon biðið um innlit í málini, sum Fiskivinnuráðið hevði viðgjørt á fundi dagin fyri. Sama dag sendir Fiskimálráðið journalistinum uppskotið til løgtingslóg, sum varð viðgjørt á fundinum, umframt upprit um og uppskot til eina kunngerð, sum eisini varð viðgjørt.

***Viðmerking:***

*§ 15, stk. 1 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *"**§ 15.** Verður áheitan um skjalainnlit sett fram viðvíkjandi skjølum, ið eru partur av máli, har sum tað er ella fer at verða tikin avgerð av einum fyrisitingarmyndugleika, avger hesin myndugleikin, um áheitanin kann verða gingin á møti. Í øðrum førum verður avgerð um skjalainnlit tikin av tí myndugleika, sum hevur skjalið undir hond."*

*Fiskivinnuráðið er skipað sambært løgtingslóg nr. 61 frá 10. mai 2000 um fiskivinnuráð og verður valt av landsstýrismanninum m.a. eftir tilmæli frá fakfeløgum og vinnufeløgum. Uppgávan hjá ráðnum er at ummæla týðandi fiskivinnumál og øll uppskot til lógir og kunngerðir, sum hava við fiskivinnu at gera, umframt at ráðið eisini av sínum eintingum kann taka fiskivinnumál til viðgerðar og lata landsstýrismanninum sítt ummæli. Fiskivinnuráðið er tí ikki ein samrunnin partin av Fiskimálaráðnum, tó at Fiskimálaráðið røkir skrivarauppgávuna.*

*Ivi kann standast um, hvør skal taka avgerð í einum innlitsmáli, tá fleiri myndugleikar fyrireika eitt mál, men ivi er ikki um, at tá tað snýr seg um lógaruppskot og hoyring í hesum sambandi, er tað avvarðandi aðalráð, sum skal taka støðu til innlitsáheitanina.*

*Viðmerkjast skal, at í ítøkiliga førinum var lógaruppskotið ikki lagt fram, tá biðið varð um innlit, og at mál um løggávu koma bert undir lógina og verða fevnd av rættinum til innlit, tá lógaruppskotið er lagt fram í tinginum. At tað er avvarðandi aðalráð, sum er rætti myndugleiki at taka støðu til innlitsáheitanina framgongur eisini av viðmerkingunum til donsku lógina, sum er fyrimynd fyri galdandi innlitslóg, sí F.T. 1985/86, ískoyti A, sp. 232:*

> *"Begæringer om aktindsigt i sager om lovgivning skal i overensstemmelse med bestemmelsen i 1. pkt. afgøres af det ministerium, under hvis område sagen hører."*

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

*Avgerðin um at veita innlit í lógaruppskotið átti at verið tikin av Fiskimálaráðnum, og Fiskivinnuráðið átti tískil at havt sent hendan partin av innlitsáheitanini víðari til Fiskimálaráðið.*

*Tað kann herumframt tykjast fløkjasligt, at skrivarin í Fiskivinnuráðnum, sum starvast í Fiskimálaráðnum í sambandi við avgreiðsluna av innlitsáheitanini, undirskrivar seg sum starvandi í Fiskimálaráðnum, tá viðkomandi í grundini virkar sum skrivari hjá Fiskivinnuráðnum.*

*Í sambandi við hesa kanning havi eg varnast, at málini hjá Fiskivinnuráðnum og Fiskimálaráðnum verða skrásett hvørt um annað í skjalaskrásetingini hjá Fiskimálaráðnum. Hetta hevur havt við sær, at eg í sambandi við hesa kanningina havi fingið fleiri mál hjá Fiskivinnuráðnum til gjøgnumgongd, hóast eg havi biðið um mál hjá Fiskimálaráðnum.*

*Vísandi til skipanarligu støðuna hjá Fiskivinnuráðnum fari eg at mæla Fiskimálaráðnum til at skipa soleiðis fyri, at skilnaður er millum málini hjá Fiskivinnuráðnum og aðalráðnum í skjalaskrásetingini.*

Mál nr. 23

Tann 1. mai 2012 biður journalistur um innlit í frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum, sum varð hildin 30. apríl 2013. Innlitsáheitanin verður avgreidd sama dag við at senda journalistinum fundarfrágreiðingina.

***Onga viðmerking, sí tó mál nr. 22.***

Mál nr. 24

Sambært telduposti 16. apríl 2013 hevur journalistur biðið um innlit í frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum, sum varð hildin 5. apríl 2013. Fiskimálaráðið sendir journalistinum frásøgnina sama dag.

***Onga viðmerking, sí tó mál nr. 22.***

Mál nr. 25
Tann 2. mai 2013 biður journalistur um innlit í viðmerkingar frá Fiskivinnuráðnum til eina ávísa kunngerð. Sama dag sendir Fiskimálaráðið journalistinum frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum 30. apríl 2013, har uppskotið varð viðgjørt.

***Onga viðmerking, sí tó mál nr. 22.***

Mál nr. 26
Við telduposti 2. mai 2013 biður journalistur um innlit í spurning frá Fiskimálaráðnum til Fiskiveiðieftirlitið og Havstovuna um treytir í sambandi við makrel- og sildafiskiskap í 2013 og svar myndugleikanna. Við telduposti 6. mai vísir Fiskimálaráðið á leinkju á heimasíðuni hjá Løgtinginum til lógaruppskotið, sum er lagt fram í Løgtinginum, harav spurningurin og hoyringarsvørini eisini framganga.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 27
Tann 2. mai 2013 biður advokatur um innlit í viðgerð og samskifti millum Fiskimálaráðið og Búnaðargrunnin um eitt ávíst festi. Tann 7. mai 2013 sendir Fiskimálaráðið advokatinum skjølini í málinum saman við málsyvirlitinum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 28
Tann 16. august 2012 biður borgari um innlit í øll tey mál, sum hava verið viðgjørd og avgjørd fyri at fremja møguleikan hjá nótaskipum og verksmiðjutrolarum at fiska makrelkvotuna, sum línuskipini fingu tillutað í 2012. Umsøkjarin nágreinar hvørji skjøl, hann serliga ynskir innlit í. Tann 27. august 2012 sendir Fiskimálaráðið borgaranum skjølini í tí eina málinum, sum ráðið sigur seg hava um hetta. Herumframt sendir Fiskimálaráðið borgaranum skjalayvirlitið í einum øðrum máli, men ikki skjølini. Fiskimálaráðið endar skriv sítt á henda hátt:

> "Møguliga eru eisini onnur mál, men vegna summarfrítíð er avmarkað arbeiðsorka í Fiskimálaráðnum í løtuni, og tí ber ikki til at finna hetta fram.

> Vinaliga boða Fiskimálaráðnum frá, um tit ynskja fleiri upplýsingar."

Tann 7. november 2012 vendir borgarin sær enn einaferð til Fiskimálaráðið við áheitan um innlit í skjøl, sum viðvíkja málum um umsiting av makrelkunngerðini í 2012, eins og spurt verður, um Fiskimálaráðið hevur onnur skjøl, sum hann átti at havt fingið í august.

Tann 14. november 2012 gevur Fiskimálaráðið borgaranum innlit í 10 mál aftrat, umframt skjalayvirlitini. Fiskimálaráðið skrivar honum samstundis eina rokning áljóðandi kr. 543,00.

Fiskimálaráðið sýtir fyri at lata innlit í 2 skjøl í tveimum ymiskum málum. Um hesi skrivar Fiskimálaráðið soleiðis:

> "Undantikið skjalainnlit eru hjálagt skjal í skjali 13 í máli xx, og upplýsing um keypsupphædd í skjali 35 í máli nr. xx. Orsøkin er, at talan er um upplýsingar um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, og at mett verður, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti hesum viðvíkjandi. Víst verður til heimild í grein 12, stk. 1, nr. 2...
>
> Tygum verða sjálvsagt kunnaður við hin partin av innihaldinum í ávíkavist skjali 13 í máli nr. xx og skjali 35 í máli nr. xx samsvarandi grein 12, stk. 2 ..
> ...
> Viðmerkjast skal, at viðvíkjandi keypsupphæddini í skjali 35 er talan um upplýsing í skjali av slíkum slag, sum vanliga ikki verður givið meirinnlit í. ..."

Sambært einum innanhýsis telduposti tann 14. november hevur málsviðgerin gjørt hesa meting í sambandi við spurningin um at sýta innlit í ávísar upplýsingar í tveimum av skjølunum:

> "Viðvíkjandi upplýsingunum um keypsupphæddirnar í skjølunum .... havi eg kannað málið nærri.
>
> Talan er um upplýsingar um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, sum eftir eini ítøkiligari meting kunnu undantakast rættinum til innlit. Spurningurin er, um tað hevur *stóran fíggjarligan týdning fyri virkið*, sum upplýsingin um keypsupphæddirnar viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.
>
> Eg havi tosað við A, advokat (advokatur fyri reiðaríið, mín viðm.) fyri løtu síðani. Hann segði m.a., at hann hevði einki ímóti, um keypsupphæddirnar vórðu strikaðar út, men at metingin var okkara.

**Ítøkilig meting**
Viðvíkjandi skjali 35 er talan um ein keypssáttmála partanna millum. Við støði í hesum og telefonsamrøðuni meti eg, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin um keypsupphæddina í skjali xx viðvíkir, at áheitanin um innlit ikki verður gingin á møti.

Viðvíkjandi skjal 60 er talan um eitt skipaskeyti. Við støði í telefonsamrøðuni meti eg, at tað hevur fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin um keypsupphæddina viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti. Tó meti eg, at við tað at talan er um upplýsing í einum skipaskeyti, sum verður útflýggjað frá Skipaskrásetingini, um biðið verður um tað, so dugi eg ikki at síggja, at tað hevur *stóran* fíggjarligan týdning fyri virkið, at áheitanin um innlit ikki verður gingin á møti. Við støði í hesum dugi eg ikki at síggja, at heimild er fyri at undantaka upplýsingina um keypssupphæddina í skjali 60. ..."

***Viðmerking:***
*Fyrra svarið hjá Fiskimálaráðnum, dagfest 27. august 2012, er ikki nøktandi. Grundgevingin um summarfrítíð seinast í august mánaði er heldur ikki nøktandi, tí Fiskimálaráðið hevur skyldu at tryggja, at onkur kann taka sær av innlitsmálinum.*

*Haraftrat sær tað út sum, at Fiskimálaráðið endar viðgerðina av málinum, hóast ráðið boðar frá, at tað ikki hevur kannað, um tað møguliga eru fleiri skjøl, sum borgarin hevur rætt at fáa innlit í, og letur tað vera upp til borgaran at venda sær aftur til Fiskimálaráðið um málið. Fiskimálaráðið átti í staðin at viðgjørt málið liðugt, so skjótt sum hetta lat seg gera, og vent aftur til klagaran við einum endaligum svari.*

*Tann 14. november 2012 sýtir Fiskimálaráðið fyri at lata borgaranum innlit í upplýsingar í tveimum skjølum vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini, sum er soljóðandi:*

> *"**§ 12.** Ræ053turin til skjalainnlit fevnir ikki um*
> *...*
> *2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkur, at áheitanin ikki verður gingin á møti."*

*Fiskimálaráðið sýtir fyri at lata innlit í keypsupphæddina í einum keypssáttmála viðvíkjandi keypi av einum línubáti, jbr. § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini. (Skjal 35)*

*Treytin fyri at kunna sýta innlit í nevndu upplýsingar er, at tað eftir eini ítøkiligari meting verður mett, at nærliggjandi vandi er fyri fíggjarligum missi, um innlit verður givið í upplýsingarnar. Í síni meting av málinum vísir Fiskimálaráðið á, at talan er um ein keypssáttmála, eins og víst verður til eina telefonsamrøðu við advokatin hjá reiðarínum. Eg dugi ikki at síggja, at nøkur ítøkilig meting er gjørd av vandandum hjá nøkrum av pørtunum fyri t.d. fíggjarligum tapi av, at innlit verður veitt í keypsupphæddina. Tó at ein útsøgn frá advokatinum hjá einum av reiðaríunum bert er vegleiðandi fyri myndugleikan, haldi eg heldur ikki, at útsøgn hansara á nakran hátt stuðlar uppundir niðurstøðuna hjá Fiskimálaráðnum. Advokaturin er einans endurgivin fyri at siga, at hann einki hevði ímóti, at innlit ikki varð givið í keypsupphæddirnar.*

*Tað sæst ikki, hvat Fiskimálaráðið hevur lagt dent á, tá tað ger ta niðurstøðu, at keypsupphæddin í skjali 35 kann undantakast, meðan sama slag av upplýsing, sum eftir øllum at døma framgongur av einum skipaskeyti, ikki kann undantakast, tí tað í hesum seinni førinum ikki verður mett at hava stóran fíggjarligan týdning, at innlitsáheitanin ikki verður gingin á møti.*

*Eftir at hava havt viðmerkingar mínar til hoyringar, hevur Fiskimálaráðið boðað frá, at ráðið hevur ikki viðmerkingar til viðgerð mína av hesum máli.*

<u>Mál nr. 29, 31 og 33</u>
Í trimum førum er søkt um innlit í kærumálið um eitt ávíst festi. Fiskimálaráðið veitir innlit, men undantekur upplýsingar við heimild í § 12, stk. 1, nr. 1.

***Viðmerking:***
*§ 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *"**§ 12.** Rætturin til skajalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um*
> *1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum,*
> *2) ..."*

*Tað framgongur ikki av málinum, hvørjar upplýsingar Fiskimálaráðið hevur undantikið, og eg havi tískil ikki møguleika at taka støðu til, um Fiskimálaráðið hevði heimild at undantaka allar tær upplýsingar, sum innlit ikki varð givið í. Eg skal í hesum sambandi vísa á, at tað er av stórum týdningi, at myndugleikin skrásetir ella kann skjalprógva júst hvørji skjøl ella hvørjar upplýsingar, innlit ikki verður latið í. Hetta hevur m.a. eisini týdning í sambandi við eina møguliga kæru-*

*ella klaguviðgerð av málinum, herundir tá metast skal um grundgevingina hjá myndugleikanum fyri at sýta innlit.*

Mál nr. 30

24. januar 2012 biður borgari um innlit í grundgevingar, skjøl, fundarfrágreiðingar og annað, tá ein kunngerð um avhending av fiskidøgum varð sett úr gildi. Tann 27. januar sendir Fiskimálaráðið viðkomandi soljóðandi svar:

> "... Sagt skal verða frá, at áheitanin er lutvíst gingin á møti. Innlit verður við hesum givið í journalyvirlit og ávís skjøl í málinum ...
>
> Undantikið innliti eru:
> Lutvíst skjal nr. 3 í málinum, har eitt upprit til landsstýrisfund er undantikið við heimild í § 10, nr. 1...., tí talan er um skjal, ið er gjørt av Fiskimálaráðnum til nýtslu á fundi millum landsstýrismenn, og skjal nr. 4 í málinum, sum er innanhýsis samskifti og harvið innanhýsis arbeiðsskjal, og skjal nr. 6, sum eisini er ávikavist innanhýsis samskifti og fundarfrásøgn og harvið innanhýsis arbeiðsskjøl. Talan er í báðum førum um skjøl, sum eru gjørd av Fiskimálaráðnum til egna nýtslu og eru tí undantikin innliti við heimild í § 7, nr. 1 ..."

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 32

*Talan er ikki um eitt innlitsmál og verður ikki viðgjørt í hesi frágreiðingini.*

Mál nr. 34

Tann 6. mars 2013 biður stjóri á almennum stovni vegna stýrið á stovninum um innlit í hoyringarskriv og viðmerkingar, sum Fiskimálaráðið hevur móttikið í sambandi við 3 lógaruppskot, sum viðvíkja virkisøkinum hjá almenna stovninum. Dagin eftir sendir Fiskimálaráðið stjóranum soljóðandi svar:

> "... Uppskotini eru enn ikki løgd fram í tinginum, og eru tí ikki fevnd av rættinum til skjalainnlit.
>
> Hinvegin er avgjørt lutvíst at geva meirinnlit í skjølini, vísandi til § 4, stk. 1, 2. pkt. ... Áheitanin er sostatt lutvíst gingin á møti. Meirinnlit verður við hesum givið í hoyringssvarini í omanfyri nevndu lógaruppskotum..."

Sama dag biður stjórin um innlit í enn eitt lóggávumál, umframt at biðið verður um at fáa fult innlit í hini 3 málini, tá lógaruppskotini eru løgd fram í Løgtinginum. Tann 12. mars 2013 svarar Fiskimálaráðið m.a., at seinasta málið, sum stjórin hevur biðið um innlit í, er ikki lagt fram í Løgtinginum, men at meirinnlit verður latið í hoyringarsvarini í málinum.

Sambært einum notati í málinum hevur málsviðgerin tann 13. mars ringt og spurt stjóran, um hann ynskir at blaða skjølini í gjøgnum ella ynskir at fáa avrit útflýggjað. Støða varð ikki tikin til hetta í telefonsamrøðuni, men sambært notatinum hevur málsviðgerin givið tí, sum skal avgreiða innlitsáheitanina, boð um, at um hann ynskir at fáa avrit útflýggjað, skal rokning skrivast. Sambært skjølunum í málinum hevur Fiskimálaráðið skrivað almenna stovninum eina rokning á kr. 576,00.

***Viðmerking:***
*Tá Fiskimálaráðið tann 7. mars 2013 tekur avgerð um at veita stjóranum innlit í hoyringarsvørini, eru lógaruppskotini ikki løgd fram í Løgtinginum. Bæði lógaruppskotini og hoyringarsvørini eru at meta sum ein partur av lóggávumálinum, sum sambært § 2, stk. 2 í innlitslógini bert eru fevnd av lógini, tá tey eru løgd fram í Løgtinginum.*

*Sambært § 1, stk. 1 í kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um alment innlit kann gjald verða tikið fyri avrit av skjølum, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina. Vísandi til at málini um hetta mundið ikki vóru fevnd av innlitslógini, hevði Fiskimálaráðið ikki heimild at krevja gjald fyri hesi skjøl. Hetta sama ger seg galdandi fyri tað fjórða málið, sum innlit varð givið í. Hetta lógaruppskotið varð ongantíð lagt fyri tingið, og málið verður tískil ongantíð fevnt av rættinum til innlit sambært innlitslógini.*

## Mentamálaráðið

Mál nr. 35

25. mai 2012 vendir borgari sær við telduposti til landsstýrismannin í mentamálum og spyr, hvør mannar eina ávísa setanarnevnd í sambandi við, at stjóri skal setast á einum stovni undir aðalráðnum. Telduposturin verður samstundis sendur aðalstjóranum og á teldupostadressuna hjá aðalráðnum. 2. juli 2012 vendir borgarin sær enn einaferð til Mentamálaráðið og biður um innlit í málið. 16. juli 2012 boðar Mentamálaráðið frá, at innlit verður ikki givið í málið vísandi til § 2 í lógini, men upplýsir samstundis, at setanarnevndin er mannað við starvsfólki úr aðalráðnum og einum uttanhýsis umboði við fakligum førleika innan økið hjá almenna stovninum.

***Viðmerking:***

*Tá ið ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit, skal hesin sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini sum skjótast taka støðu til, hvørt umbønin kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað als ikki nøktandi, at áheitanin í fyrsta umfari sleppur at liggja óviðgjørd, eins og tað heldur ikki er nøktandi, at innlitsáheitan í øðrum umfari ikki verður svarað fyrr enn 14 dagar eftir, at Mentamálaráðið móttók rykkjaran, uttan at hava sent borgaranum eina fráboðan um, hví tað dregur út at svara áheitanini.*

*Eg havi tó onga viðmerking til, at Mentamálaráðið sýtir fyri at lata innlit í málið. Sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini er bert ásetingin í § 6 um notatskyldu galdandi fyri mál um setan í starv ella flytan í hægri starv. Ella við øðrum orðum, mál, ið snúgva seg um starvssetanir eru ikki fevnd av innlitslógini, og tískil er eingin lógarheimilaður rættur til alment innlit í hesi mál.*

Mál nr. 36

20. august 2012 biður journalistur um innlit í tilmælið um at seta stjóra á einum ávísum almennum stovni undir aðalráðnum. Mentamálaráðið sýtir dagin eftir fyri at veita innlit í tilmælið við teirri grundgeving, at setanarmál sambært § 2 í innlitslógini ikki eru fevnd av lógini.

***Onga viðmerking, sí tó eisini mál nr. 35 um innlit í starvssetanarmál.***

<u>Mál nr. 37</u>
17. juli 2008 biður journalistur um at fáa innlit í svarið hjá aðalstjóranum til landsstýriskvinnuna viðv. fíggjarstøðuni á einum stovni undir Mentamálaráðnum. Av málinum framgongur, at journalisturin frammanundan hevði fingið innlit í spurningarnar frá landsstýriskvinnuni til aðalstjóran. 22. juli 2008 sýtir aðalráðið fyri at geva innlit vísandi til, at talan er um eitt innanhýsis skjal. Eftir at journalisturin biður ráðið um at taka málið uppaftur og biður um at fáa eina nágreiniligari grundgeving, sendir Mentamálaráðið tann 23. juli 2008 journalistinum soljóðandi svar:

> "Í fyrra umfarinum fekst tú innlit í fleiri skjøl, enn tú sambært lógini hevur rætt til. Sonevnt meirinnlit. Tað merkir ikki, at øll innanhýsis skjøl skulu latast út. Skjalið, tú biður um, er ikki fevnt av kravinum um alment innlit. Eftir at hava viðgjørt tína umbøn eru vit komin til ta niðurstøðu, at tað verður ikki latið meirinnlit í nevnda skjal."

***Viðmerking:***
*Skrivligt samskifti millum ein landsstýrismann og aðalstjóran um eitt mál er at meta sum innanhýsis skjøl, sum er fevnt av § 7, og sum í útgangsstøðinum ikki er fevnt av rættinum til innlit.*

*Tá ið eitt skjal er fevnt av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7 í innlitslógini, skal myndugleikin meta um, um tað eru ítøkiligar upplýsingar í skjalinum, ið skulu latast sambært § 11, stk. 1 í innlitslógini, sum er soljóðandi:*

> *"§ 11. Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av §§ 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar."*

*Eg havi lisið svarið hjá aðalstjóranum til landsstýriskvinnuna, og eftir mínum tykki innihalda svarini í fleiri førum upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, og sum Mentamálaráðið tískil eftir mínum tykki átti at latið innlit í. Eg skal tó samstundis gera vart við, at eg havi ikki sæð hini skjølini í málinum, og fyrivarni má tí takast fyri, at hesar somu upplýsingar framganga av teimum skjølum, sum journalisturin av fyrstan tíð fekk innlit í.*

*Í sínum svari til journalistin vísir Mentamálaráðið á, at skjalið, sum biðið verður um innlit í, er ikki fevnt av rættinum til alment innlit, og at Mentamálaráðið hevur gjørt av ikki at lata innlit í tað eftir regluni um meirinnlit.*

*Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt í innlitslógini kann ein myndugleiki loyva skjalainnliti í størri mun, enn lógin ásetir, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Hetta merkir, at hóast skjøl og upplýsingar sambært innlitslógini eru undantikin frá rættinum til innlit, so kann myndugleikin gera av at veita innlit í hesi.*

*Mentamálráðið hevur í einum slíkum føri skyldu til at umhugsa áheitanina um at veita meirinnlit og í hesum sambandi at taka viðkomandi og saklig atlit. Aftrat hesum kemur, at sambært §§ 21 og 23 í fyrisitingarlógini skal ein avgerð, sum verður fráboðað skrivliga, og sum ikki til fulnar gongur partinum á møti, hava eina grundgeving. Hvílir avgerðin á eina fyrisitingarliga meting, skal grundgevingin tilskila tey høvuðsfyrilit, sum, hava verið avgerandi fyri metingina.*

*Av svarinum til journalistin verður einki nevnt um, hvørji atlit ráðið byggir sínir avgerð á, og hetta framgongur í aðramáta heldur ikki av málinum.*

*Eg haldi ikki viðgerðina av áheitanini um meirinnlit ella svarið uppá hesa vera nøktandi.*

<u>Mál nr. 38</u>
22. januar 2013 biður journalistur um innlit í eitt yvirlit yvir uttanlandsferðir hjá landsstýrismanninum í mentamálum í 2010, 2011 og í 2012. 25. januar 2012 sendir Mentamálaráðið journalistinum eitt slíkt yvirlit.

***Viðmerking:***
*Sambært § 4, stk. 3 skal ein áheitan um skjalainnlit skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at verða gjørdur kunningur við. Kravt kann tí verða, at tann, ið ynskir skjalainnlit, undir øllum umstøðum hevur ein ávísan kunnleika til, at málið er til, áðrenn hann vendir sær til myndugleikan. Umsitingin hevur ikki skyldu til at ganga eini áheitan á møti um at síggja øll mál av einum ávísum slag ella øll mál, ið eru journaliserað í einum ávísum tíðarskeiði. Av tí at almenni í fyrisitingini hevur stóran týdning fyri møguleikan hjá fjølmiðlunum at viðgera og kunna um mál í fyrisitingini, eigur ein tílík áheitan frá fjølmiðlunum sambært vegleiðingini til innlitslógina tí vanliga at verða gingin á møti, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m.*

*Eg kann tí bara taka undir við viðgerðini hjá Mentamálaráðnum av hesum máli.*

Mál nr. 39

10. november 2012 biður journalistur um innlit í úrslitini frá seinastu landsroyndini í fólkaskúlanum, herundir samlaða úrslitið, úrslitini í einstøku skúlunum, einstøku flokkunum og hjá einstøku næmingunum. Journalisturin biður samstundis Mentamálaráðið umhugsa at lata meirinnlit í upplýsingarnar. 15. november 2012 sýtir Mentamálaráðið fyri at veita innlit í útslitini við teirri grundgeving, at tað er ásett í § 14. stk. 5 í fólkaskúlalógini, at úrslitini eru í trúnaði. Umrødda ásetingin er soljóðandi:

> "Landsstýrismaðurin skipar fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki eftir nærri ásettum reglum. Landsstýrismaðurin kunnger miðalúrslitið fyri landið í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki og almannakunnger samstundis frágreiðing um royndarúrslitið. Royndarúrslitini hjá einstaka næminginum, sbr. tó stk. 8, flokkinum ella skúlanum, eru í trúnaði. Starvsfólk skúlans o.o., sum taka ímóti ella viðgera úrslitini í landsroyndini, hava tagnarskyldu um hesar upplýsingar." *(Mín undirstriking)*

***Viðmerking:***

*§ 14 í innlitslógini ásetir, at skyldan hjá myndugleikunum at lata innlit er avmarkað av serstøkum ásetingum um tagnarskyldu, ið eru ásettar við lóg ella við heimild í lóg fyri persónar, ið virka í almennari tænastu ella starvi. Hetta merkir, at innlit kann ikki krevjast í upplýsingar, um tað í lóg ella við heimild í lóg er áløgd starvsfólki hjá myndugleikanum ein serlig tagnarskylda viðvíkjandi upplýsingunum. Tagnarskyldan verður í slíkum føri roknað sum eitt serligt undantak til høvuðsregluna um rættin til innlit í øll skjøl og upplýsingar.*

*Sambært viðmerkingunum til § 14, stk. 5 í fólkaskúlalógini (Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 26. mai 2011) er serliga tagnarskyldan grundað á fyriliti fyri at verja anonymitetin hjá einstøku næmingunum, og, við tí í huga at landsroyndin er eitt eftirmetingaramboð, at fyribyrgja, at almenna umrøðan snýr seg um, hvør skúli ella flokkur er best ella ringast. (Lm 77/2008) Vísandi til omanfyri standandi havi eg onga viðmerking til, at Mentamálaráðið sýtir fyri at lata innlit í úrslitini.*

*Sambært regluni um meirinnlit, hava myndugleikar møguleika at geva innlit í meira, enn lógin áleggur, men teir eru samstundis avmarkaðir av reglunum um tagnarskyldu. Av somu orsøk hevur Mentamálaráðið heldur ikki møguleika at lata innlit í úrslitini eftir regluni um meirinnlit í § 4, stk. 1, 2. pkt.*

Mál nr. 40

4. januar 2011 biður journalistur um innlit í málið um at seta eina “fjølmiðlakommissión at skriva álit um verandi og framtíðar støðu fjølmiðlanna í Føroyum”. Biðið verður serliga um innlit í endamálsorðingina, og hvør mannar kommissiónina. 6. januar 2011 svarar Mentamálaráðið, at tað í eina tíð hevur verið arbeitt innanhýsis við málinum, men at kommissiónin er ikki sett, og at Mentamálaráðið einki tilfar hevur at útflýggja.

***Viðmerking:***

*Av tí at tað ikki framgongur av sjálvum innlitsmálinum, hvørji (innanhýsis) skjøl eru í málinum, sum biðið verður um innlit í, havi eg ikki møguleika at taka støðu til grundgevingina hjá Mentamálaráðnum um, at eingi skjøl (ella upplýsingar) eru at lata innlit í.*

Mál nr. 41

*Av tí at so long tíð, 8 ár, er fráliðin, síðani hetta málið varð viðgjørt og avgreitt av Mentamálaráðnum, og málið ikki er av prinsipiellum slag, havi eg gjørt av ikki at viðgera málið nærri í hesi frágreiðing.*

Mál nr. 42

5. februar 2013 biður journalistur um innlit í fráfaringaravtalurnar hjá tveimum navngivnum starvsfólkum á einum stovni undir Mentamálaráðnum. 11. februar 2013 svarar Mentamálaráðið journalistinum, at ongar fráfaringaravtalur eru í málinum.

***Viðmerking:***

*Eg havi havt høvið at lesa skjølini í málinum. Av málinum framgongur, at sera nógv samskifti hevur verið millum Mentamálaráðið, leiðaran og ávís starvsfólk á stovninum. Millum skjølini í málinum er harumframt ein frágreiðing frá eini ráðgevingarfyritøku um almenna stovnin, sum er frá tíðini undan innlitsumbønini, og av hesari framgongur, at ein fráfaringaravtala er gjørd við tað eina starvsfólki (hjálparfólki), sum journalisturin spyr um.*

*Av tí at fráfaringaravtalan ikki var til skjals í málinum hjá Mentamálaráðnum, er svarið hjá Mentamálaráðnum um, at ongar fráfaringaravtalur eru í málinum, ikki skeivt, men eg haldi, at svarið hjá Mentamálaráðnum kann vera misvísandi, tá Mentamálaráðið ikki samstundis upplýsir, at ráðið er vitandi um, at ein fráfaringaravtala er gjørd fyri tað eina starvsfólki.*

*Sambært § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini skal ein fyrisitingarmyndugleiki, sum fær eina skrivliga áheitan, sum ikki viðvíkur málsøkinum hjá honum, um gjørligt senda rætta myndugleika áheitanina. Sambært hesum átti Mentamálaráðið at vegleitt journalistin um at venda sær til almenna stovnin við innlitsáheitanini ella av sínum eintingum sent almenna stovninum innlitsáheitanina at viðgera.*

*Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ráðið er samt við umboðsmannin í, at innlitsáheitanin átti at verið send almenna stovninum.*

<u>Mál nr. 43</u>
31. januar 2013 biður journalistur um innlit í málið viðv. ónøgd hjá starvsfólkum við ein leiðara á einum stovni undir Mentamálaráðnum. Biðið verður somuleiðis um, at Mentamálaráðið tekur støðu til at lata meirinnlit. Sambært telduposti 14. februar 2013 sendir Mentamálaráðið journalistinum skjøl í málinum, umframt skjalayvirlit.

***Viðmerking:***
*Sambært svarinum frá Mentamálaráðnum til journalistin kann ein fáa ta fatan, at Mentamálaráðið hevur sent journalistinum øll skjølini í málinum. Í málinum liggur tó eisini eitt skjalayvirlit, har tað út fyri nøkur av skjølunum er sett eitt minustekn, og hetta kundi bent á, at journalisturin ikki hevur fingið innlit í øll skjølini í málinum.*

*Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og Mentamálaráðið hevur tískil skyldu til at greiða journalistinum frá, um hann fær innlit í øll skjølini ella ikki. Fær journalisturin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at Mentamálaráðið partvís sýtir umbønini, og í einum slíkum føri hevur Mentamálaráðið sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.*

*Eftir mínum tykki eru í skjali 206 í málinum upplýsingar, sum eru fevndar av § 12, stk. 1, nr. 1 um privat viðurskifti hjá einstaklingum, og sum ikki áttu at verið latnar*

*víðari. Talan er um, eftir upplýsingunum í málinum at døma, ógrundaðar skuldsetingar móti starvsfólki um møgulig revsiverd viðurskifti.*

*Tað er av alstórum týdningi, at tílíkar eymar upplýsingar verða handfarnar við størsta varsemi, og tískil er tað serstakliga óheppið, at Mentamálaráðið hevur givið innlit í hesar upplýsingar.*

*Mentamálaráðið hevur boðað frá, at tað tekur viðmerkingar mínar til hetta mál til eftirtektar.*

<u>Mál nr. 44</u>
11. desember 2012 biður journalistur um innlit í skjølini í málinum um próvtølini í einum fólkaskúla. 4. januar 2013 sendir Mentamálaráðið journalistinum skjøl í málinum saman við eini umbering fyri seina avgreiðslu. 14. februar 2013 vendir journalisturin sær enn einaferð til Mentamálaráðið og biður um at fáa innlit í skjøl í málinum frá 4. januar 2013 til d.d. 20. februar 2013 sendir Mentamálaráðið journalistinum skjølini 37 – 87 í málinum.

***Viðmerking:***
*Skjølini, sum Mentamálaráðið í fyrsta umfari lat journalistinum innlit í, liggja ikki í málinum, sum eg havi fingið til láns. Eg dugi tískil ikki at síggja, um journalisturin hevur fingið øll skjølini, ella um Mentamálaráðið hevur undantikið okkurt skjali. Eg havi tískil ikki møguleika at viðgera handfaringina av málinum nærri.*

*Eg fari tó – á sama hátt sum í máli nr. 43 - at viðmerkja, at eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og Mentamálaráðið hevur tískil skyldu til at greiða journalistinum frá, um hann fær innlit í øll skjølini ella ikki. Fær journalisturin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at Mentamálaráðið partvís sýtir umbønini, og í einum slíkum føri hevur Mentamálaráðið sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.*

<u>Mál nr. 45</u>
12. mars 2013 biður ein advokatur um innlit í skjølini viðvíkjandi verkætlanini at byggja miðnámsskúla í Marknagili. Tveir dagar seinni biður Mentamálaráðið advokatin um at nágreina umbønina nærri, tí talan er um eitt sera rúgvusmikið mál. Dagin eftir hetta boðar advokaturin frá, at hon ynskir innlit í skjøl frá 1. august

2012 fram til d.d. 2. apríl 2013 sendir Mentamálaráðið umbidnu skjølini umfamt skjalayvirlitið í málinum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 46

22. mars 2013 biður journalistur um innlit í endaliga ársroknskapin hjá Kringvarpi Føroya fyri 2011. 4. apríl 2013 játtar Mentamálaráðið umbønini og sendir journalistinum ársfrásøgnina, grannskoðanarprotokollina og roknskapin fyri 2011.

***Viðmerking:***

*Tá Mentamálaráðið ikki megnaði at avgreiða innlitsáheitanina innan 10 dagar, átti aðalráðið sambært § 16 í innlitslógini at havt sent journalistinum eina fráboðan um, nær áheitanin kundi væntast at verða avgreidd.*

Mál nr. 47

10. apríl 2013 biður journalistur um innlit í nýtsluna av játtanini til teknmálstulking. 12. apríl 2013 sendir Mentamálaráðið journalistinum eitt yvirlit yvir nýtsluna í 2012 saman við eini frágreiðing um, hvat peningurin vanliga verður nýttur til og nýtslu av møguligum avlopi.

***Onga viðmerking***

Mál nr. 48

18. apríl 2013 biður journalistur um innlit í grundgevingarnar fyri, at tríggir limir seinasta árið hava sagt seg úr stýrinum fyri Kringvarp Føroya. Slakar tveir tímar seinni sendir Mentamálaráðið journalistinum fráboðanirnar til Mentamálaráðið hjá teimum trimum limunum, har tey siga seg úr sessinum í kringvarpsstýrinum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 49

25. apríl 2013 biður journalistur um innlit í, hvussu nógvar heimasíður ein ávís lýsingarfyritøka hevur gjørt fyri aðalráðið, eins og biðið verður um innlit í, hvussu nógv hesar kosta, og hvussu nógv tær kosta at reka árliga ella mánaðarliga. 1. mai

2013 játtar Mentamálaráðið viðkomandi innlit við at svara spurningunum og senda avrit av rokningum frá lýsingarfyritøkuni.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 50

Knýtta í eitt teldubræv 28. apríl 2013 sendir borgari Mentamálaráðnum eina áheitan um innlit. 8. mai 2013 játtar Mentamálaráðið innlit og sendir sambært svarskrivinum viðkomandi tilfar, sum lýsa og svara spurningunum í innlitsáheitanini.

***Viðmerking:***

*Einans teldubrævið er skrásett í málinum, meðan sjálv innlitsáheitanin, sum var viðfest teldubrævinum, ikki er skrásett í málinum. Tí ber ikki til at síggja, hvat viðkomandi hevur biðið um innlit í. Hetta er sjálvsagt ikki nøktandi. At døma eftir teimum skjølunum, sum Mentamálaráðið hevur lagt í málið, snúði umbønin seg um innlit í málið um at gera nýggja lóg um lærara- og pedagogútbúgvingina. Víst verður eisini til viðmerkingar mínar til mál nr. 86 um skráseting av skjølum.*

## Vinnumálaráðið

<u>Mál nr. 51</u>
Tann 31. januar 2011 søkir journalistur um innlit í samskifti millum Vinnumálaráðið og Íleggingargrunnin síðani mars 2010 í sambandi við útbygging av Vága Floghavn. Tann 11. februar 2011 sendir Vinnumálaráðið journalistinum soljóðandi svar:

> "... Umbønin er gingin á møti, tó er eitt telefonnotat frá samrøðu við skrivaran í Íleggingargrunninum undantikið eftir § 13, nr. 6 (§ 13, stk. 1, nr. 6). Mett verður í hesum føri, at vegna serligar umstøður í málinum er neyðugt at undantaka skjalið fyri at verja bæði almenn og privat áhugamál."

***Viðmerking:***
*Sambært § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini kann rætturin til skjalainnlit avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.*

*Sambært einum telefonnotati í málinum hevur málsviðgerin í Vinnumálaráðið sett seg í samband við skrivaran í Íleggingargrunninum og spurt hann, um hann helt orsøk vera til at undantaka skjøl ella upplýsingar í samskiftinum millum Íleggingargrunnin og Vinnumálaráðið frá almennum innliti. Sambært notatinum helt skrivarin í Íleggingargrunninum, at innlit átti ikki at verið givið í eitt telefonnotat viðv. nevndarformanninum í P/F Vága Floghavn.*

*§ 13, stk. 1, nr. 6 er ein undantaksregla, sum einans kann nýtast í heilt serligum førum. Tað framgongur ikki av skjølunum í málinum, hvør grundgevingin er fyri at undantaka telefonnotatið, annað enn at skrivarin í Íleggingargrunninum heldur, at innlit ikki átti at verið givið. Grundgevingin er eftir mínum tykki ikki nøktandi.*

*Av tí at umrødda telefonnotatið ikki lá í málinum, heitti eg á Vinnumálaráðið um at lata mær umrødda telefonnotatið saman við viðmerkingum til málsviðgerðina.*

*Vinnumálaráðið ásannar, at grundgevingin fyri ikki at lata innlit í telefonnotatið møguliga ikki var nóg ítøkilig og sigur í sínum viðmerkingum, at grundgevingin var, at í notatinum eru metingar av navngivnum persóni, sum kunnu verða viðkomandi at skaða, og ráðið metir framvegis, at tað var rætt ikki at lata innlit í telefonnotatið.*

*Eftir at hava lisið umrødda telefonnotatið havi eg hesar viðmerkingar til viðgerðina av málinum:*

*Telefonnotatið endurgevur eina telefonsamrøðu millum málsviðgeran í Vinnumálaráðnum og skrivaran í Íleggingargrunninum, sum snýr seg um ein fund, sum skal verða ímillum Íleggingargrunnin og almenna partafelagið. Talan er sostatt um eitt innanhýsis skjal, sum í útgangsstøðinum er undantikið innliti eftir § 7 í innlitslógini.*

*Sambært § 11 hevur myndugleikin tó skyldu at lata innlit í upplýsingar í skjalinum um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið. Eftir mínum tykki inniheldur telefonnotatið fyri tað mesta upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, sum innlit átti at verið givið í eftir § 11, stk. 1.*

*Vinnumálaráðið metir, at tað í notatinum eru metingar av navngivnum persóni, sum kunnu verða viðkomandi at skaða, og metir tí framvegis, at tað var rætt ikki at lata innlit í telefonnotatið (við heimild í § 13, stk. 1, nr. 6).*

*§ 13, stk. 1, nr. 6 er sum nevnt ein undantaksregla, sum einans kann nýtast í heilt serligum førum, og eg meti ikki Vinnumálaráðið hava grundgivið fyri, at tað vegna verju av munandi umhugsni viðvíkjandi privatum áhugamálum er neyðugt at dylja upplýsingarnar. Greitt er tað, at nevndarformaðurin í almenna partafelagnum verður umrøddur, men eg meti ikki upplýsingarnar í skjalinum vera av einum slíkum slag, at treytin fyri at undantaka tær eftir § 13, stk. 1, nr. 6 er lokin.*

Mál nr. 52

Tann 29. mars 2011 søkir journalistur um innlit í alt samskiftið millum aðalráðið og Posta í sambandi við aðalfundin og komandi eykaaðalfundin. Tann 5. apríl verður latið innlit í skjølini í málinum við undantøku av skjølunum 4, 5, 12 og 13 við teirri grundgeving, at talan er um innanhýsis skjøl, jbr. § 7 í innlitslógini.

***Viðmerking:***

*Eg havi lisið skjølini í málinum, og eg havi onga viðmerking til viðgerðina av málinum.*

Mál nr. 53

Tann 1. mai 2013 biður ein kommuna um avrit av skrivum, sum aðalráðið hevur sent tveimum ávísum kommunum ávísar dagar um stuðul til bakkaverju. Tann 14. mai 2013 rykkir kommunan eftir svari, sum ráðið sendir sama dag.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 54

Tann 25. apríl 2013 søkir tíðindaportalur innlit í, hvussu nógvar heimasíður ein ávís lýsingarfyritøka hevur gjørt fyri Vinnumálaráðið, hvussu nógv hetta hevur kostað, og hvussu stórur árligi raksturin er av hesum. Tann 1. mai 2013 svarar Vinnumálaráðið, at umrødda lýsingarfyritøkan hevur gjørt eina heimasíðu fyri ráðið, eins og kostnaðurin verður upplýstur.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 55

14. mars 2013 biður journalistur um innlit í ætlanarskrivið, sum varð sent virðisbrævamarknaðinum í sambandi við ætlanina at einskilja Atlantsflog. Hetta verður sent journalistinum eina viku seinni.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 56

22. januar 2013 biður journalistur um eitt yvirlit yvir uttanlandsferðir hjá landsstýrismanninum í 2012, 2011 og 2010. Tann 30. januar 2013 sendir Vinnumálaráðið journalistinum eitt yvirlit yvir ferðirnar hjá landsstýrismanninum í nevnda tíðarskeiði við upplýsingum um dagfestingar og ferðamál.

***Onga viðmerking.*** *Víst verður eisini til viðmerkingar mínar til m.a. mál nr. 38.*

Mál nr. 57

*Málið er ikki tikið við í kanningina av tí, at Løgtingsins umboðsmaður áður hevur viðgjørt hetta sum eitt vanligt klagumál, sí LUM 201300043.*

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Mál nr. 58

Tann 9. januar 2013 biður borgari um innlit í málið um at nýta NemId sum talgilda undirskriftaskipan. Dagin eftir biður Vinnumálaráðið viðkomandi um at nágreina innlitsáheitanina og bjóðar viðkomandi at ringja til ein ráðgeva í ráðnum. Eftir øllum at døma vendir viðkomandi ikki aftur til ráðið, og tann 28. januar 2013 skrivar ráðið til viðkomandi, at einki skjal fyriliggur í málinum, har avgerð er tikin um at nýta NemId. Upplýst verður, at málið er viðgjørt politiskt á landsstýrisfundi, men at innlit ikki fæst í skjøl frá hesum fundum.

***Viðmerking:***

*Sambært § 4, stk. 1 skal ein innlitsáheitan skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnigan við. Hetta fyrst og fremst til tess at myndugleikin skal kunna finna fram rætta málið. Sjálv innlitsáheitanin er greið, og eg dugi ikki at síggja, at neyðugt er at biðja viðkomandi um at nágreina innlitsáheitanina, tá tað seinni vísir seg, at eingi skjøl, burtursæð frá einum uppriti til landsstýrisfund, eru í málinum.*

*Tó at upprit til landsstýrisfund ikki eru fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 10, nr. 1, sæst Vinnumálaráðið ikki sambært § 11, stk. 1 at hava mett um, um upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, eru í uppritinum, og sum Vinnumálaráðið tískil hevði skyldu til at lata innlit í.*

Mál nr. 59

Tann 1. mai 2013 biður journalistur um innlit í tilmælið um setan av stjóra á einum stovni undir Vinnumálaráðnum. Seinni sama dag sýtir Vinnumálaráðið umbønini við teirri grundgeving, at starvssetanarmál eru undantikin almennum innlit.

***Onga viðmerking.*** *Sí eisini viðmerkingar mínar til m.a. mál nr. 16.*

Mál nr. 60

Tann 17. januar 2013 biður journalistur um innlit í fráfaringaravtalu, sum ráðið skal hava gjørt við ein fráfarnan stjóra á einum almennum stovni. Eisini verður biðið um innlit í setanaravtaluna og uppsagnarskrivið. Ein hálvan tíma seinni svarar Vinnumálaráðið, at eingin fráfaringaravtala er gjørd við nevnda stjóran, og sendir journalistinum setanaravtaluna og uppsøgnina frá stjóranum.

***Onga viðmerking.***

## Fíggjarmálaráðið

Mál nr. 61
29. apríl 2013 biður journalistur um innlit í hoyringsskrivið frá Fíggjarmálaráðnum til Erhvervs- og Vækstministeriet um SIFI-peningastovnar umframt brævið frá donsku ráðharrastovuni, har Fíggjarmálaráðið verður biðið um at gera viðmerkingar. Seinni sama dag fær journalisturin skjølini sendandi við telduposti.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 62
25. februar 2013 biður journalistur um innlit í alt samskifti við allar stovnar og feløg, sum Fíggjarmálaráðið hevur havt um mál um vantandi tolling av vøru hjá einum ávísum virki.

Journalisturin er serliga áhugaður í samskifti um møguligar avtalur, sum eru gjørdar í hesum sambandi. 6. mars 2013 boðar Fíggjarmálaráðið journalistinum frá, at øll starvsfólk í Fíggjarmálaráðnum eru ógegnig at viðgera innlitsáheitanina, og at ráðið hevur heitt á Løgmansskrivstovuna um at taka sær av málinum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 63
19. februar 2013 verður søkt um innlit í samskifti millum Fíggjarmálaráðið og donsku myndugleikarnar um ríkisveitingina til Føroyar árini 2002 – 2012. Tað framgongur av innanhýsis samskiftið í Fíggjarmálaráðnum um málið ein góðan mánað seinni, at málsviðgeri hevur tosað í telefon við tann, sum bað um innlit, og biðið viðkomandi koma í ráðið at kanna tilfarið. Niðurstøðan frá samrøðuni var, at hann skuldi venda aftur, um hann hevði tørv á fleiri upplýsingum enn teimum, sum hann fekk í telefonsamrøðuni.

***Viðmerking:***
*Eitt mál, har søkt verður um innlit, er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og reglurnar í fyrisitingarlógini og § 6 í innlitslógini um notatskylduna eru galdandi fyri viðgerðina av málinum.*

*Eg havi onga viðmerkingar til, at upplýsingar verða givnar munnliga, men tá hetta er at meta sum eitt týðandi málsviðgerðarstig, átti Fíggjarmálaráðið beinanvegin at notera, at viðkomandi hevði fingið svar í telefonini, nær hetta var, og hvørjar upplýsingar viðkomandi hevði fingið.*

*Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at tað tekur viðmerkingar mínar til eftirtektar.*

<u>Mál nr. 64</u>
21. januar 2013 biður journalistur um innlit í skriv frá einum peningastovni til Fíggjarmálaráðið fyrst í oktober 2012 um lønarhæddaravgjald. Seinni sama dag verður netleinkja til skrivið sent journalistinum við telduposti.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 65</u>
3. januar 2013 biður journalistur um innlit í samskiftið og avtaluna frá juni 2012 millum Fíggjarmálaráðið og eina ávísa kommunu um avdráttarskáa. 15. januar 2013 sendir Fíggjarmálaráðið journalistinum skjølini við teldupost saman við eini umbering um drúgva viðgerðartíð vegna eina misskiljing.

***Viðmerking:***
*Vísandi til § 16 í innlitslógini átti Fíggjarmálaráðið innan 10 dagar at havt sent viðkomandi eina fráboðan um, nær ráðið væntaði at kunna avgreiða áheitanina.*

*Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at tað tekur viðmerkingar mínar til eftirtektar.*

<u>Mál nr. 66</u>
30. november 2012 biður journalistur um innlit í samskifti millum donsku stjórnina og landsstýrið um ES fíggjareftirlitið. 6. desember 2012 sendir Fíggjarmálaráðið skjølini við telduposti.

***Onga viðmerking***

Mál nr. 67
11. oktober 2012 biður journalistur Fíggjarmálaráðið um innlit í kæru frá landsstýrinum í 2010 til nevndina í einum landsstovni um stjóran og svarið frá nevndini uppá kæruna. 19. oktober 2012 svarar Fíggjarmálaráðið, at tað einki kennir til tílíka kæru og sendir journalistinum eina frágreiðing um, hvat fór fram í málinum umframt skjøl í málinum, herundir eina frásøgn frá landsstýrisfundi.

***Viðmerking:***
*Eg havi onga viðmerking til viðgerðina av hesum máli annað enn at staðfestast kann, at Fíggjarmálaráðið hevur givið journalistinum meirinnlit í eina frásøgn frá landsstýrisfundi.*

Mál nr. 68
12. oktober 2012 biður privatpersónur um innlit í roknskapirnar hjá eini ávísari kommunu fyri tíðarskeiðið 2000 og fram til dags dato. Biðið verður um at fáa tilfarið talgilt. 15. oktober 2012 sendir Fíggjarmálaráðið umsøkjaranum roknskapirnar fyri 2008 - 2011. Viðvíkjandi øðrum árum verður umsøkjarin biðin um at venda sær til kommununa ella Innlendismálaráðið, sum umsat málsøkið undan Fíggjarmálaráðnum.

***Viðmerking:***
*Sambært § 15, stk. 1., 2. pkt. er tað tann myndugleikin, sum hevur skjølini, sum er rætti myndugleiki at viðgera eina innlitsáheitan, og eg kann tí bara taka undir við, at Fíggjarmálaráðið vegleiðir viðkomandi um at venda sær til kommununa ella Innlendismálaráðið fyri at fáa teir roknskapir, sum Fíggjarmálaráðið ikki hevur.*

Mál nr. 69
11. juli 2012 biður løgfrøðilesandi í sambandi við serritgerð um alment innlit um innlit í viðgerðina av øllum umsóknum um alment innlit í einum ávísum tíðarskeiði, har innlit heilt ella partvís er sýtt, umframt mál, har Fíggjarmálaráðið hevur givið meirinnlit. Tann 11. september 2012 svarar Fíggjarmálaráðið innlitsáheitanini skrivliga við at upplýsa, at í 2011 hava 15 biðið um innlit, harav 14 fingu játtandi svar, og at ráðið í 2012 hevði fingið 13 umbønir, og at allar umbønirnar vóru játtaðar. Uppá fyrispurning sigur Fíggjarmálaráðið seg ikki duga at svara, um ráðið í nøkrum føri hevur givið meirinnlit. Tað framgongur av málinum, at tann løgfrøðilesandi m.a. eisini hevur fund við journalføraran.

***Viðmerking:***
*Sambært § 4, stk. 3 skal ein áheitan um skjalainnlit skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at verða gjørdur kunningur við. Kravt kann tí verða, at tann, ið ynskir skjalainnlit, undir øllum umstøðum hevur ein ávísan kunnleika til, at málið er til, áðrenn hann vendir sær til myndugleikan. Umsitingin hevur ikki skyldu til at ganga eini áheitan á møti um at síggja øll mál av einum ávísum slag ella øll mál, ið eru journaliserað í einum ávísum tíðarskeiði.*

*Eg havi sum í míni viðmerking til mál nr. 38 víst á, at av tí at almenni í fyrisitingini hevur stóran týdning fyri møguleikan hjá fjølmiðlunum at viðgera og kunna um mál í fyrisitingini, eigur ein tílík áheitan frá fjølmiðlunum sambært vegleiðingini til innlitslógina tí vanliga at verða gingin á møti, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Hetta sama ger seg galdandi fyri áheitanir av tílíkum slag frá t.d. lesandi og granskarum.*

*Fíggjarmálaráðið hevur í einum slíkum føri tó ikki nakra skyldu til at gera niðurstøður um málsviðgerðina av málunum, men eg haldi tað ikki vera nøktandi, at Fíggjarmálaráðið ikki er ført fyri at svara, um ráðið í nøkrum av málunum hevur givið meirinnlit. Eg fari í hesum sambandi at vísa á týdningin av, at ráðið onkursvegna hevur yvirlit yvir avgerðir og venju á einum málsøki til tess at fyribyrgja einstøk ógrundaði frávik frá venjuni.*

Mál nr. 70
21. juni 2012 biður journalistur um innlit í samskiftið, sum hevur verið millum Fíggjarmálaráðið og danska skattamálaráðið og/ella danska fíggjarmálaráðið um føroysku skattingina av pensjónum við inngjald. Tann 5. juli sendir Fíggjarmálaráðið journalistinum skjøl í málinum saman við umbering fyri drúgvu viðgerðartíðina.

***Viðmerking:***
*Vísandi til § 16 átti Fíggjarmálaráðið innan 10 dagar at havt sent viðkomandi eina fráboðan um, nær ráðið væntaði at kunna avgreiða áheitanina.*

*Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at tað tekur viðmerkingar mínar til eftirtektar.*

Mál. nr. 71, 74 og 75

Í trimum málum frá ávikavist 2003, 2005 og 2008 er biðið um innlit í mál hjá lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, har lønarsamráðingar eru ella hava verið við eitt fakfelag um løn og setanarviðurskifti hjá starvsfólkum hjá landinum. Lønardeildin hevur í fyrstu syftu sýtt innlit í øll 3 málini.

Svarið hjá lønardeildini uppá innlitsáheitanirnar er í høvuðsheitum, at innlit verður ikki givið í samráðingarmál, tí hetta kann skaða samráðingartilgongdina.

Grundgevingin í máli nr. 75 er soljóðandi:

> "Fyrst er at siga, at vit geva ikki innlit í samráðingarmál. Tað einasta, sum verður almannakunngjørt, er semjan, tann nýggi sáttmálin, tær nýggju lønartalvurnar og møguliga okkurt annað skriv, sum í tí sambandi verður almannakunngjørt.
>
> Innlit verður ikki givið í samráðingarfrágreiðingar, roknistykki, upprit, uppskot ella nakað annað, sum verður gjørt undir samráðingunum.
>
> Tá ið biðið verður um lønarútrokningar, er svarið tí, at tað geva vit ikki innlit í."

Í máli nr. 74 verður biðið um innlit í øll skjøl í samskiftinum millum Maksinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið um maskinmeistararnar á vaktarskipunum. Fíggjarmálaráðið sýtir fyri, vísandi til § 13, stk. 1, nr. 5, at geva innlit í málið við soljóðandi grundgeving:

> "Yvirhøvur metir Fíggjarmálaráðið, at tað skaðar samráðingartilgongdini, um innlit verða latin í tílík mál. Harumframt ger tað seg serliga galdandi, at í hesum føri er málið ikki liðugt, og tí er harumframt ein nærliggjandi vandi fyri, at tað kann skaða samráðingarstøðuna hjá landinum at lata innlit."

Í máli nr. 71 svarar lønardeildin soleiðis:

> "Til hetta er at siga, at Lønardeildin gevur ikki innlit í samráðingarmál. Talan er um innanhýsis arbeiðsskjøl. Haraftrat hevði tað givið Lønardeildini trupulleikar í framtíðar samráðingum um vit góvu alment innlit í samráðingarmál. Og kann hetta skaða fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna – víst verður til § 13, stk. 1, nr. 5 í lógini um alment innlit."

Í seinasta málinum svarar umsøkjarin aftur við at vísa á, at § 13, stk. 1, nr. 5 gevur ikki heimild til generelt at undantaka skjøl men ítøkiligar upplýsingar og heitir á

lønardeildina um at taka umbønina uppaftur til viðgerðar. Biðið verður samstundis um innlit í málið um flokking av stjórastarvinum á einum ávísum almennum stovni.

Eftir at hava viðgjørt áheitanina enn einaferð, boðar lønardeildin frá, at hon hevur gjøgnumgingið sáttmálasakina, og at næstan einki tilfar er í málinum um tað, sum biðið er um.

Lønardeildin letur tó innlit í umbidnu skjølini um flokking av stjórastarvinum. Millum hesi er m.a. ein lønargjaldsumbøn fyri stjóran, sum m.a. inniheldur upplýsingar um p-talið og kontunummarið í peningastovni hjá stjóranum.

***Viðmerking:***
*§ 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *"**§ 13.** Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi*
> *...*
> *5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella*
> *...*
> *Stk. 2 Um umstøður sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."*

*Sambært viðmerkingunum til lógarásetingina (FT 85/86A, sp. 229) er ásetingin m.a. ætlað at verða nýtt í teimum førum, har tað almenna hevur sáttmálasamráðingar um lønar- og starvsfólkaviðurskifti.*

*Hetta merkir, at lønardeildin heilt ella partvís kann sýta fyri at geva innlit í skjøl viðvíkjandi samráðingum, sum tað almenna hevur um løn- og starvsfólkaviðurskifti. Lønardeildin kann tó ikki sýta fyri at lata innlit í málini sum heild uttan at gera eina ítøkiliga meting eftir stk. 2. Hetta sæst Lønardeildin ikki at hava gjørt í málunum nr. 71 og 74.*

*Hinvegin so er talan um samráðingarmál, og tað má tí metast at vera av stórum týdningi at fyribyrgja, at mótparturin fær innlit í taktisk upplegg hjá almenna sáttmálapartinum. Hetta talar eftir míni meting fyri, at ásetingin ikki verður tulkað trongt.*

*Eftir at Lønardeildin eftir áheitan frá tí, sum bað um innlit, hevði viðgjørt innlitsáheitanina í mál nr. 71 av nýggjum, gav lønardeildin viðkomandi innlit í skjølini í málinum, sum snúðu seg um flokking av stjórastarvinum á einum ávísum almennum stovni. Millum hesi skjøl er m.a. ein lønargjaldsumbøn fyri stjóran, sum m.a. inniheldur bæði p-talið og kontunummarið hjá stjóranum.*

*Bæði p-talið og kontunummar verða roknað sum eymar upplýsingar um einstaklingar, sum sambært § 12, stk. 1 í innlitslógini um privat viðurskifti hjá einstaklingum, eru undantiknar rættinum til innlit.*

*Tað er av alstórum týdningi, at tílíkar eymar upplýsingar verða handfarnar við størsta varsemi, og tískil er tað serstakliga óheppið, at lønardeildin hevur givið innlit í hesar upplýsingar.*

*Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at tað tekur viðmerkingar mínar til eftirtektar.*

<u>Mál nr. 72</u>

*Talan er um ein fyrispurning frá einum stovni til lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um ein spurning um innlit. Málið verður ikki viðgjørt í hesi frágreiðing.*

<u>Mál nr. 73</u>

*Av tí at so long tíð er fráliðin, síðani hetta málið varð viðgjørt og avgreitt, og málið ikki er av prinsipiellum slag, havi eg gjørt av ikki at viðgera málið nærri í hesi frágreiðing.*

## Almannamálaráðið

Mál nr. 76

Tann 1. mai 2013 søkir journalistur um innlit í umsókn frá Tvøroyrar Kommunu um stuðul at byggja og reka búpláss til eldri. Dagin eftir setir Almannamálaráðið útgreinandi spurningar til innlitsáheitanina, sum journalisturin svarar tann 7. mai 2013. Innlitsáheitanin verður avgreidd sama dag.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 77

Tann 25. apríl 2013 søkir tíðindaportalur innlit í, hvussu nógvar heimasíður ein ávís lýsingarfyritøka hevur gjørt fyri Almannamálaráðið, hvussu nógv hetta hevur kostað, og hvussu stórur árligi raksturin er av hesum. Tann 1. mai 2013 svarar Almannamálaráðið, at umrødda lýsingarfyritøkan onga heimasíðu hevur gjørt fyri ráðið.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 78

22. apríl 2013 søkir journalistur innlit í tølini um heildarætlanina um harðskap í parløgum. Tann 25. apríl útgreinar journalisturin innlitsáheitanina, og sama dag bjóðar Almannamálaráðið journalistinum at koma at hyggja at skjølunum. Tann 30. apríl biður journalisturin um avrit av skjølunum, sum Almannamálaráðið sendir honum sama dag.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 79

Tann 19. apríl 2013 biður journalistur um innlit í eina ætlan at byggja hús/íbúðir. Biðið verður um innlit í prísir, stødd og byggiskrá. Tann 21. apríl gevur Almannamálaráðið umsøkjaranum partvíst innlit, samstundis sum upplýst verður, at Landsverk er byggiharri, og at Landsverk tískil er rætti myndugleiki at viðgera tann

partin av innlitsáheitanini, sum snýr seg um prísir. Almannamálaráðið heitir samstundis á Landsverk at viðgera hendan partin av innlitsáheitanini.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 80</u>
17. januar 2013 søkir journalistur innlit í lønarviðurskiftini hjá stjóra eftir samanlegging av tveimum stovnum. Almannamálaráðið svarar innlitsáheitanini 1 tíma seinni.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 81</u>
2. oktober 2012 søkir journalistur Løgmansskrivstovuna um innlit í, hvør var til alment hátíðarhald, tá nýggja sjúklingahotellið í Keypmannahavn lat upp, og hvat luttøkan kostaði. Av tí at Løgmansskrivstovan bert er rætti myndugleiki at svara fyri løgmann, hevur Løgmansskrivstovan dagin eftir sent Almannamálaráðnum innlitsáheitanina at viðgera. Tann 5. oktober hevur Almannamálaráðið sent journlistinum ferðauppgerð hjá landsstýriskvinnuni og rokning frá ferðaskrivstovu.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 82 (sí eisini mál nr. 83)</u>
23. august 2012 søkir journalistur innlit í kostnaðin av ferð hjá landsstýris- og embætisfólki til umhvørvisráðstevnu til Rio de Janeiro. Hálvan annan tíma seinni svarar Almannamálaráðið, at fjølmiðilin longu hevur fingið innlit í umrøddu upplýsingarnar frá Løgmansskrivstovuni, sum samskipaði ferðina, og heitir á journalistin um at venda sær til annan navngivnan journalist á fjølmiðlinum ella navngivnan persón á Løgmansskrivstovuni.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 83 (sí eisini mál nr. 82)</u>
22. juni 2012 søkir journalistur Løgmansskrivstovuna um innlit í endamál við ferðini til Rio de Janeiro og samlaða kostnaðin av hesum. Løgmansskrivstovan,

sum samskipaði ferðina fyri Løgmansskrivstovuna, Almannamálaráðið og Innlendismálaráðið, bjóðar sær til at samskipa viðgerðina av innlitsáheitanina, og heitir tann 28. juni 2012 á Almannamálaráðið um at upplýsa kostnaðin hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum. Tann 2. juli 2012 sendir Løgmansskrivstovan journalistinum skjøl við upplýsingum um endamálið við og kostnaðin av ferðini.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 84</u>

15. juni 2012 søkir journalistur innlit í eina frágreiðing frá Høvuðsbarnaverndarnevndini um avgerðina í einum ítøkiligum máli, sum fer at verða handað Almannamálaráðnum tríggjar dagar seinni. Tann 22. juni 2012 biður journalisturin enn einaferð um frágreiðingina. Tann 25. juni 2012 tekur Almannamálaráðið avgerð um at játta journalistinum innlit í ein part av frágreiðingini. Innlit verður ikki givið í aðrar partar av frágreiðingini grundað á, at talan er um upplýsingar um eitt ítøkiligt barnaverndarmál, og Almannamálaráðið undantekur tí hesar við heimild í § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini. Seinni sama dag sendir journalisturin Almannamálaráðnum enn eina áheitan um innlit í frágreiðingina saman við eini fulltrú frá pápanum í barnaverndarmálinum. Journalisturin biður samstundis um, at skjølini verða týdd til danskt. Tann 27. juni 2012 svarar Almannamálaráðið, at innlitsumbønin nú skal viðgerast eftir reglunum um partsinnlit í fyrisitingarlógini, og av tí at pápin sambært skjølunum í málinum er umboðaður av navngivnum advokati, metir ráðið seg bert kunna útflýggja skjøl eftir beinleiðis áheitan frá pápanum ella advokati hansara. Dagin fyri hevur pápin biðið um innlit í frágreiðingina, sum hann fær sendandi við vanligum posti. Boðað verður samstundis frá, at ráðið hevur ikki møguleika at týða skjølini til danskt.

***Viðmerking:***

*Eg havi lisið alla frágreiðingina frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, og eg kann taka undir við viðgerðini hjá Almannamálaráðnum.*

*Um undantøku av upplýsingum eftir § 12, stk. 1, nr. 1 verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 101.*

*Rætturin til innlit fevnir sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. um skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð. Ein myndugleiki hevur ikki, í sambandi við eini innlitsáheitan, skyldu til at framleiða nýggj skjøl, og*

*tí hevur ein myndugleiki sambært innlitslógini ikki nakra skyldu til at týða skjøl ella upplýsingar.*

Mál nr. 85

7. mai 2012 biður journalistur um innlit í yvirlit yvir ellisheim/røktarheim, bústovnar, vardar stovnar, verkstøð og onnur tilboð, sum Almannamálaráðið varðar av, umframt upplýsingar um tal av starvsfólkum og normeringar á stovnunum. Dagin eftir sendir Almannamálaráðið journalistinum eina móttøkuváttan, og tveir dagar eftir hetta verður innlitsáheitanin send Nærverkinum til víðari avgreiðslu, samstundis sum journalisturin verður kunnaður um hetta.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 86

21. februar 2012 biður journalistur um innlit í samskiftið millum Almannamálaráðið og Almannastovuna (nú Almannaverkið) um møguligar avleiðingar av verkfallinum hjá einum fakfelag. Almannamálaráðið sendir sama dag eina móttøkuváttan, og 29. februar verður innlit givið. Tann 19. mars 2012 vendir Almannamálaráðið sær til journalistin og boðar frá, at journalisturin ikki hevði fingið øll skjølini í málinum, av tí at eitt skriv, sum hoyrdi til málið, var skrásett í einum øðrum máli.

***Viðmerking:***

*Skráseting av skjølum er, umframt at vera ein fortreyt fyri at málsviðgerðin kann eftirkannast, eisini ein fortreyt fyri, at reglurnar um innlit virka til fulnar, og sambært góðum fyrisitingarsiði áliggur tað einum myndugleika at skráseta inn- og útgangandi skriv, eisini teldubrøv, skjótast gjørligt.*

*Tað er sjálvsagt óheppið, at skjøl, ið hoyra til eitt ávíst mál, verða skrásett skeivt ella í øðrum máli, enn tað hoyrir til. Av tí at Almannamálaráðið verður varugt við feilin og av sínum eintingum vendir aftur til journalistin og gevur honum innlit í skjalið, geri eg ikki meira við hetta.*

Mál nr. 87

12. september 2011 biður journalistur um innlit í hoyringssvarið hjá uppsagda stjóranum á einum ávísum almennum stovni. Tann 21. september veitir Almannamálaráðið journalistinum partvíst innlit. Grundgevingin er soljóðandi:

> "Sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini eru mál um setan í starv og framflytan í hægri starv ikki fevnd av almennum innliti. Hetta málið snýr seg lutvíst um eina starvssetan (stjóra fyri samanlagda stovnin) og sum eina avleiðing av hesum eisini eina uppsøgn av ... úr starvinum sum stjóri fyri ... .
>
> Viðheftur er tann parturin av hoyringsskrivinum, sum er fevndur av rættinum til innlit. Tann parturin av skrivinum, sum beinleiðis viðvíkur setanarmálinum er strikaður vísandi til § 2, stk. 1 í lógini."

***Viðmerking:***

*Eg havi lisið umrødda hoyringsskrivið, og eg havi onga viðmerking til viðgerðina hjá Almannamálaráðnum. Víst verður eisini til mál nr. 35.*

Mál nr. 88

12. september 2011 biður journalistur um innlit í skjøl, sum eru grundarlag undir avgerðini at leggja tveir ávísar almennar stovnar saman. Tann 16. september 2011 veitir Almannamálaráðið journalistinum partvíst innlit. Grundgevingin er soljóðandi:

> "Innlit verður givið í skjølini nr. 2, 3, 5, 6, 7, 8, 9, 28, 30, 33, 34, 35, 40, 41, 43, 44, 45, 57, 59, 60, 61, 62, 63, 67, 68, 69, 71, 72 og 74.
>
> Eisini verður innlit givið í skjal nr. 66, men ikki viðhefta uppritið til landsstýrisfund, sum er undantikið rættinum til innlit sambært § 10, nr. 1. Uppritið inniheldur ikki upplýsingar, sum eru fevndir av § 11 í lógini.
>
> Innlit verður ikki givið í skjølini nr. 1, 4, 10, 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19, 20, 21, 22, 23, 24, 25, 27, 31, 32, 36, 37, 38, 39, 42, 46, 47, 48, 49, 50, 51, 52, 53, 54, 55, 56, 58, 64, 73 og 76. Hesi skjøl eru innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru undantikin innlit sambært § 7 í lógini. Skjølini innihalda ikki upplýsingar um fakta av týdningi fyri málið sambært § 11, sum ikki eru at finna í øðrum skjølum, ið innlit verður givið í.

> Hóast ásetingina í § 10, nr. 1 í lógini, hevur landsstýriskvinnan samsvarandi § 4, stk. 1, seinasta pkt., tikið avgerð um at geva Kringvarpinum innlit í uppritið, sum er sent á landsstýrisfund um ætlaðu samanleggingina, skjal 29 og 26 ."

Tann 22. september vendir fjølmiðilin sær til Almannamálaráðið við áheitan um viðgera innlitsáheitanina av nýggjum. Tann 26. september sendi Almannamálaráðið journalistinum soljóðandi teldubræv.:

> "Sambært innlitslógini § 7 er alt samskifti millum landsstýrisfólk og embætisfólk í sama ráði at meta sum innanhýsis arbeiðsskjøl, og er hetta undantikið almennum innliti. Hinvegin er innlit latið í samskiftið við aðrar myndugleikar og onnur uttanfyristandandi.
>
> Omanfyri nevnda innlitsumbøn er eftir okkara fatan svarað og avgreidd samsvarandi innlitslógini við skrivi, dagfest 16. sept. 2011.
>
> Tygum vísa til eina gjøgnumgongd av journalyvirlitinum, sum eftir tykkara meting ber boð um nakað annað. Almannamálaráðið skal í hesum sambandi biðja tygum útgreina, hvat tað er, sum tygum meina við. Fyribils gevur teldubræv tygara okkum ikki orsøk at viðgera innlitsumbønina av nýggjum."

Tveir dagar seinni biður journalisturin um innlit í skjal 1, sum ber heitið "frámæli um at leggja saman ... og ...". 2. oktober 2011 boðar Almannamálaráðið journalistinum frá, at teirra fatan framvegis er, at skjal 1 er eitt innanhýsis arbeiðsskjal, sum ikki er fevnt av rættinum til innlit sambært § 7 í innlitslógini, og at skjalið ikki inniheldur faktuellar upplýsingar, sum innlit átti at verið givið í eftir § 11.

***Viðmerking:***
*Eg havi lisið øll skjølini í umrødda málinum, og eg eri samd við Almannamálaráðið um, at øll skjølini, sum ráðið hevur undantikið við heimild í § 7, burtursæð frá einum undantaki (skjal 65), eru at meta sum innanhýsis skjøl, og at hesi ikki innihalda fakta av týdningi fyri málið sambært § 11, sum ikki er at finna í øðrum skjølum, sum innlit er latið í.*

*Eg havi biðið Almannamálaráðið um at greiða mær frá heimildini til at undantaka skjal 65, sum er ein starvsgreining, ið ein uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt fyri Almannamálaráðið.*

*Almannamálaráðið metir, eftir at hava viðgjørt málið enn einaferð, ikki heimild vera fyri at undantaka nevnda skjal frá innliti. Hesum eri eg samd við Almannamálaráðið í.*

*Eg havi onga viðmerking til, at ráðið hevur undantikið skjal 66 frá innliti, sum er eitt upprit til landsstýrisfund frá løgmanni, sum er undantikið innliti, jbr. § 10, nr. 1.*

*Eg havi noterað mær, at ráðið, hóast upprit til landsstýrisfund eru undantikin innlit, hevur latið journalistinum meirinnlit í tvær útgávur av sama uppriti til landsstýrisfund frá landsstýriskvinnuni í almannamálum.*

Mál nr. 89

26. januar 2010 biður journalistur um innlit í málið um tveir ávísar stovnar fyri børn og ung. Journalisturin ynskir innlit í stovningargrundarlag, virkisætlan, roknskapir, tal av búfólki, niðurstøður, frágreiðingar og ætlanir fyri stovnarnar, og grundgevingar fyri at flyta stovnarnar undir Almannastovuna og so undir Nærverkið. Tveir dagar seinni váttar Almannamálaráðið móttøkuna av innlitsáheitanini, og 4. februar 2010 verður partvís innlit givið.

***Viðmerking:***

*Í svarinum uppá innlitsáheitanina verður sagt, at okkurt skjal inniheldur persónligar upplýsingar, sum eru strikaðar við heimild í § 12 (privat viðurskifti, mín viðm.). Skjølini í fullari longd lógu ikki í málinum, og eg heitti tí á Almannamálaráðið um at lata mær hesi. Eftir at hava lisið skjølini í fullari longd, havi eg onga viðmerking til tann partin av málinum, sum snýr seg um at undantaka upplýsingar sambært § 12, stk. 1, nr. 1.*

*Eftir at hava gjøgnumgingið skjølini enn einaferð hevur Almannamálaráðið boðað mær frá, at upplýsingar í tveimum skjølum vórðu yvirstrikaðar, men at ráðið í dag metir, at innlit kundi verið latið í skjølini í sínari heild.*

*Hóast Almannamálaráðið við svartari tusj hevði yvirstrikað upplýsingar í omanfyri nevndu skrivum, bar í fleiri førum til at lesa upplýsingarnar í avritunum, sum vórðu latin umboðsmanninum. Eg bað Almannamálaráðið um at gera viðmerkingar til hetta.*

*Í sínum viðmerkingum sigur Almannamálaráðið seg halda seg til eina fasta mannagongd, tá upplýsingar verða strikaðar í skjølum og harmast um, at viðkomandi upplýsingar, hóast strikaðar, framvegis kunnu lesast.*

*Eg fari at mæla Almannamálaráðnum til at taka neyðug stig til at tryggja, at trúnaðarupplýsingar í einum slíkum føri verða fjaldar á ein slíkan hátt, at tær ikki kunnu lesast av óviðkomandi.*

## Heilsumálaráðið

Mál nr. 90

Tann 30. apríl 2013 søkir borgari um innlit í eina verkætlan, sum fer fram í samstarvi millum eitt danskt universitet og eitt danskt universitetshospital. Biðið verður serliga um innlit í skjøl, sum kunnu lýsa fíggjarviðurskiftini í verkætlanini. Tann 7. mai 2013 svarar Heilsumálaráðið, at tað er ikki partur av málinum og mælir umsøkjaranum til at stíla innlitsáheitanina til Ílegusavnið ella Landssjúkrahúsið, eins og avrit av svarinum verður sent nevndu stovnum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 91

Tann 25. apríl 2013 søkir tíðindaportalur innlit í, hvussu nógvar heimasíður ein ávís lýsingarfyritøka hevur gjørt fyri Heilsumálaráðið, hvussu nógv hetta hevur kostað, og hvussu stórur árligi raksturin er av hesum. Tann 29. apríl 2013 svarar Heilsumálaráðið, at umrødda lýsingarfyritøkan onga heimasíðu hevur gjørt fyri ráðið.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 92

Tann 14. mars 2013 søkja tveir journalistlesandi um innlit í møguligt samskifti millum Danmark og Føroyar í sambandi við at seta í gildi nýggja donsku fosturtøkulógina í 1973 og í skjøl, sum lýsa eina møguliga viðgerð av málinum í Føroyum. Tann 18. mars 2013 boðar Heilsumálaráðið frá, at tað er Løgmansskrivstovan, sum hevur møgulig skjøl frá teirri tíðini í varðveitslu, umframt at áheitanin eisini kann setast Ríkisumboðnum.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 93

Tann 19. mars 2013 søkir umboð fyri eitt vinnufelag um innlit í alt samskiftið, herundir fundarfrásagnir, telefonnotat og samskifti annars millum Heilsumálaráðið og Apoteksverkið í málinum um einkarrættin hjá Apotekinum at selja heilivág til

alivinnuna í Føroyum. Tann 21. mars 2013 svarar Heilsumálaráðið, at tað hevur trý journalmál um evnið, at tvey teirra eru í skjalagoymsluni á Løgmansskrivstovuni, og um áheitanin snýr seg um hesi mál, kann áheitanin setast Løgmansskrivstovuni. Tað sæst ikki í málinum, at umsøkjarin hevur vent aftur til Heilsumálaráðið um málið.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 94</u>

Tann 18. mars 2013 biður journalistur um innlit í m.a. frásagnir frá fundum millum umboð fyri Heilsumálaráðið og løgregluna um trupulleikar við heilivági, sum verður brúktur sum rúsevni. Sambært einum telefonnotati hevur journalisturin tann 3. apríl 2013 ringt til Heilsumálaráðið at rykkja eftir svari uppá innlitsáheitanina. Heilsumálaráðið upplýsti, at landsstýrismaðurin hevði havt ein fund við løgregluna, men at fundarfrásøgnin var ikki góðkend av luttakarunum enn. Upplýst varð somuleiðis, at tað ikki høvdu verið fundir um trupulleikar við heilivági. Tann 11. apríl 2013 sendir Heilsumálaráðið journalistinum "frásøgn frá fundi millum landsstýrismannin, løgregluna, Apoteksverkið, Taks og Fólkaheilsuráðið um rúsevnisstøðuna í Føroyum."

***Viðmerking:***

*Tá ið ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit, skal hesin sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini sum skjótast taka støðu til, hvørt umbønin kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað als ikki nøktandi, at áheitanin ikki verður viðgjørd, fyrr enn journalisturin rykkir eftir svari 16 dagar eftir, at umbønin av fyrstan tíð varð send ráðnum.*

*Eitt skjal, sum ikki er endaligt, er at meta sum eitt innanhýsis skjal sbrt. § 7, stk. 1, nr. 1, og eg havi tí onga viðmerking til, at Heilsumálaráðið í fyrsta umfari sýtti fyri at veita innlit í frásøgnina.*

<u>Mál nr. 95</u>

11. mars 2013 biður journalistur um innlit í skjøl, sum lýsa viðgerðina hjá Heilsumálaráðnum av einum tilmæli frá nøkrum læknum um at seta átøk í verk at forða fyri og diagnostisera sjúkur í Føroyum. Somuleiðis verða fyrispurningar settir

viðvíkjandi verkætlanini FarGen. 19. mars 2013 sendir Heilsumálaráðið journalistinum upplýsingar um fígging av FarGen og upplýsir, at restin av umbidnu skjølunum kann heintast í móttøkuni á Heilsumálaráðnum.

***Viðmerking:***
*Millum skjølini, sum Heilsumálaráðið letur innlit í, eru bæði innanhýsis fundarfrágreiðingar, upprit til landsstýrisfund og innanhýsis samskifti, og tó at tað ikki framgongur av málinum, er helst talan um, at Heilsumálaráðið hevur gjørt av at lata meirinnlit í hesi skjøl eftir regluni um meirinnlit.*

<u>Mál nr. 96</u>
4. mars 2013 søkir journalistur um innlit í eftirmetingini av 1870-tænastuni. 11. mars 2013 svarar Heilsumálaráðið, at frásøgnin frá eftirmetingarfundinum er ikki góðkend, men at hon verður send skjótast gjørligt. 3. apríl 2013 sendir Heilsumálaráðið journalistinum umbidnu frásøgnina saman við einum yvirliti yvir tey viðurskifti, sum fundarluttakararnir høvdu gjørt vart við, og sum ynski var um at arbeiða víðari við.

***Viðmerking:***
*Eitt skjal, sum ikki er endaligt, er at meta sum eitt innanhýsis skjal sbrt. § 7, stk. 1, nr. 1, og eg havi tí onga viðmerking til, at Heilsumálaráðið í fyrsta umfari sýtti fyri at veita innlit í frásøgnina.*

<u>Mál nr. 97</u>
17. januar 2013 biður journalistur um innlit í tilboð og samskifti við danska vikarstovu um at útvega læknar til heilsuverkið. 21. januar 2013 sendir Heilsumálaráðið journalistinum avrit av samstarvsavtaluni millum Almanna- og heilsumálaráðið og vikarstovuna, ískoytisavtalu um leinging av verandi avtalu og samskiftið millum partarnar í hesum sambandi.

***Onga viðmerking.***

<u>Mál nr. 98</u>
17. januar 2013 biður journalistur um innlit í fráfaringaravtaluna, sum varð gjørd við fyrrverandi stjóran á einum almennum stovni, umframt uppsagnarskrivið og upprunaligu setanaravtaluna. Seinni sama dag sendir Heilsumálaráðið

journalistinum fráfaringaravtaluna og setanaravtaluna. Upplýst verður samstundis, at einki uppsagnarskriv varð skrivað, men at uppskot til eitt ætlanarskriv varð skrivað. Av tí at hetta ongantíð varð sent, sýtir Heilsumálaráðið at lata innlit í hetta.

***Viðmerking:***
*Sambært § 7, stk. 1 fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Eitt uppskot til eitt skriv, sum ikki er sent, er at meta sum eitt innanhýsis skriv, sum er gjørt til egna nýtslu, og eg havi tí onga viðmerking til viðgerðina av hesum máli.*

<u>Mál nr. 99</u>
Sambært einum telefonnotati hevur journalistur 11. januar 2013 ringt til Heilsumálaráðið og biðið um innlit í uppritini um heilsunýskipan og heilsuskipanir fyri børn og ung, sum vóru fyri á landsstýrisfundi seinast. Sama dag sendir Heilsumálaráðið journalistinum uppritini.

***Viðmerking:***
*Av tí at bert uppritini liggja í innlitsmálinum og eingi onnur skjøl, havi eg ikki møguleika fyri at meta um, hvørt talan er um, at Heilsumálaráðið í hesum føri hevur latið skjølini sambært regluni um meirinnlit, ella um talan er um upplýsingar, sum Heilsumálaráðið hevur skyldu at lata sambært regluni um ekstrahering í § 11, stk. 1.*

<u>Mál nr. 100</u>
11. januar 2011 biður journalistur um innlit í øll skjøl og samskifti um avgerðina hjá landsstýrismanninum at niðurleggja føðideildina á einum sjúkrahúsi. 13. januar 2011 sendir Heilsumálaráðið journalistinum øll skjøl í málinum. Í tí eina skrivinum, einum skrivi frá Landssjúkrahúsinum um starvstilboð til jarðarmøðurnar á áðurnevnda sjúkrahúsi, hevur Heilsumálaráðið strikað út nøvnini á jarðarmøðurnum.

***Viðmerking:***
*Vísandi til at starvsfólkamál generelt eru fevnd av lógini um alment innlit dugi eg ikki at síggja, at Heilsumálaráðið hevur heimild at undantaka nøvnini á jarðamøðurnum.*

*Uppá fyrispurning um grundgevingina fyri at strika nøvnini á jarðarmøðrunum út hevur Heilsumálaráðið greitt frá, at málið ikki er viðgjørt sum eitt starvsfólkamál,*

*men sum eitt mál um virksemisbroyting í sjúkrahúsverkinum, sum politisk avgerð var tikin um. Júst hvussu hetta skal skiljast í mun til heimildarspurningin er ógreitt.*

*Um upplýsingar í einum máli skulu undantakast innlit, krevst heimild, og eg dugi sum nevnt ikki at síggja, at Heilsumálaráðið hevur heimild at undantaka nøvnini á jarðarmøðrunum.*

<u>Mál nr. 101</u>
10. desember 2010 biður journalistur um innlit í eina klagu, sum ein borgari, sum er innlagdur á psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, hevur sent Heilsumálaráðnum um viðferðina á Psykiatriska deplinum. 14. desember 2010 sýtir Heilsumálaráðið fyri at veita innlit í málið við soljóðandi grundgeving:

> "Sambært § 12, stk. 1 í løgtingslóg um alment innlit fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um upplýsingar um privat viðurskifti hjá einstaklingum. Málið, sum víst verður til, er av slíkum slagi, at alt málið er undantikið sambært § 12, stk. 1. Tí verður umbønin um innlit ikki gingin á møti."

***Viðmerking:***
*§ 12, stk. 1, nr. 1 og stk. 2 í innlitslógini eru soljóðandi:*

> *"**§ 12.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um*
> *1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum,*
> *2) ...*
> *Stk. 2. Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk.1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum."*

*Lógargreinin snýr seg um, at eym persónlig viðurskifti, ella tað, sum má sigast at hoyra privatlívinum til, ikki er fevnt av rættinum til innlit. Ásetingin fevnir bara um upplýsingar í málinum og ikki um heil mál.*

*Tó eru summi sløg av málum soleiðis háttað, at rætturin til innlit í praksis ikki fevnir um málið í síni heild, tí allar upplýsingarnar eftir eina ítøkiliga gjøgnumgongd kunnu undantakast. Hetta kunnu vera m.o. barnaverndarmál og eisini ítøkiliga málið, sum snýr seg um ein persón, sum er innlagdur á psykiatriska depilinum. Sjálvt ein upplýsing um, at ein ávísur persónur er partur í einum slíkum máli, kann eftir umstøðunum verða undantikin almennum innliti.*

*Eg havi lisið skjølini í málinum, og eg havi onga viðmerking til, at Heilsumálaráðið hevur sýtt journalistinum innlit í málið í síni heild.*

<u>Mál nr. 102</u>

7. januar 2010 biður journalistur um innlit í tilmælið, sum bygginevndin viðvíkjandi út- og umbyggingini av Landssjúkrahúsinum hevur latið landsstýrismanninum í heilsumálum í sambandi við prosjektering og bygging av nýggjum psykiatriskum depli. Eisini verður biðið um annað samskifti og skjøl annars í málinum. Tann 15. januar 2010 sýtir Heilsumálaráðið journalistinum innlit við soljóðandi grundgeving:

> "Umsóknin verður ikki játtað. Grundgevingin fyri hesum er, at talan er um skjalatilfar, sum er partur av einum lóggávumáli, sum Heilsumálaráðið fyrireikar, nevniliga broytingar í verklagslógini fyri umrøddu bygging. Hetta skjalatilfarið er tí undantikið almennum innliti, til lógaruppskotið er lagt fram í Løgtinginum, sbrt. § 2, stk. 2 í innlitslógini.
>
> Tá tíðin er búgvin til tess, fer landsstýrismaðurin at kunna almenningin um ætlanirnar fyri byggingina."

***Viðmerking:***

*Mál um lóggávu koma bert undir lógina og verða fevnd av rættinum til innlit, tá lógaruppskotið er lagt fram í Løgtinginum. Sambært heimasíðuni hjá løgtinginum varð umrødda mál (løgtingsmál 82/2010) lagt fram 16. februar 2011, og eg havi tískil onga viðmerking til viðgerðina av hesum máli.*

## Løgmansskrivstovan

Mál nr. 104

Tann 25. februar 2013 biður journalistur um innlit í svar frá løgmanni til skriv frá Landsstýrismálanevndini í sambandi við klagu um fyrisitingina av makrelfiskiskapi. Umrødda svarið verður sent journalistinum hálvan tíma seinni.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 105

Tann 21. mars 2013 biður journalistur um innlit í, hvussu nógv verandi landsstýrisfólk fingu útgoldið hvør sær í ferðaendurgjaldi í 2012, teirra bústaðarkommunu tann 31. desember 2012, og hvussu nógv verandi landsstýrisfólk hvør sær fáa útgoldið í ferðaendurgjaldi um mánaðin í 2013. Sambært telduposti sendir Løgmansskrivstovan journalistinum umbidnu upplýsingarnar dagin eftir.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 106

Tann 25. apríl 2013 søkir tíðindaportalur innlit í, hvussu nógv ein ávís heimasíða hevur kostað at menna, hvør árligi raksturin er, og hví arbeiðið ikki er boðið út millum føroyskar veitarar. Sambært telduposti í málinum hevur Løgmansskrivstovan 6. mai 2013 sent tíðindaportalinum svar uppá nevndu spurningarnar.

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 107

Tann 22. apríl 2013 biður journalistur um innlit í alt samskiftið millum Ognarfelagið LÍV og løgmann/Løgmansskrivstovuna í sambandi við søluna av LÍV. Tann 2. mai 2013 biður Løgmansskrivstovan journalistin um at útgreina, um tað er nakað ávíst samskifti ella tíðarskeið, hann ynskir innlit í.

Sambært skjølunum í málinum er gongdin í málinum eftir hetta, at journalisturin í fyrsta umfari biður um journalyvirlitið, men tað sæst ikki, um hetta verður sent

honum. Síðani sendir Løgmansskrivstovan journalistinum avrit av einum skrivi til landsstýrismannin í vinnumálum, og seinni sama dag sendir Løgmansskrivstovan journalistinum fleiri onnur skjøl í málinum. At enda spyr journalisturin, um hetta er tað, sum er av samskifti millum Løgmansskrivstovuna og Ognarfelagið, men tað sæst ikki av skjølunum, um Løgmansskrivstovan svarar honum.

***Viðmerking:***
*Um tað er ógreitt, hvat ein journalistur biður um innlit í, ella er talan um eitt rúgvusmikið mál, og tað má haldast, at journalisturin ikki ynskir innlit í øll skjølini men okkurt ávíst, er einki til hindurs fyri, at myndugleikin biður journalistin um at nágreina, um tað er nakað ávíst, hann ynskir innlit í. Hetta eigur tó at verða gjørt skjótast gjørligt, og ikki uttan serliga orsøk taka 10 dagar sum í itøkiliga málinum.*

*Sambært skjølunum í málinum fær journalisturin hvørki umbidna skjalayvirlitið, sum er fevnt av rættinum til innlit sambært § 5, stk. 1, nr. 2, ella svar uppá spurningin, um hann hevur fingið øll skjølini í málinum.*

<u>Mál nr. 108</u>
Tann 22. januar 2013 biður journalistur um yvirlit yvir uttanlandsferðir hjá løgmanni í 2010, 2011 og 2012. Tveir dagar seinni sendir Løgmansskrivstovan journalistinum eitt yvirlit yvir ferðirnar hjá løgmanni í nevnda tíðarskeiði.

***Onga viðmerking. Víst verður eisini til mál nr. 38.***

<u>Mál nr. 109</u>
Tann 22. januar 2013 biður journalistur um innlit í semjuna millum ein fyrrverandi aðalstjóra og Løgmansskrivstovuna og øll viðkomandi skjøl í málinum. 24. januar 2013 sendir Løgmansskrivstovan fyrrverandi aðalstjóranum, Lønardeildini og viðkomandi aðalráði skjølini (nr. 22 – 48) í málinum saman við uppskoti til innlitsavgerð og biður hesi gera viðmerkingar til ætlaðu avgerðina. Tann 4. februar 2013 svarar fyrrverandi aðalstjórin, at hann ongar viðmerkingar hevur, og sama dag verður avgerðin fráboðað journalistinum.

***Viðmerking:***
*Tá biðið verður um innlit í eitt starvsfólkamál, er starvsfólkið, sum málið er um, ikki partur av fyrisitingarliga málinum, og myndugleikin hevur tí skil ikki sambært*

*fyrisitingarlógini skyldu til at partshoyra viðkomandi starvsfólk um málið ella at grundgeva fyri viðgerðini.*

*Tað er tó góður fyrisitingarsiður, at starvsfólkið verður kunnað um eina tílíka innlitsáheitan og á henda hátt fær høvi at gera vart við síni sjónarmið, áðrenn avgerð verður tikin í málinum. Serliga til tess at fyribyrgja, at innlit verður latið í upplýsingar um privat viðurskifti, sum ikki eru fevndar av rættinum til innlit sambært § 12, stk. 1, nr. 1. Sí eisini LUM 200600063. Eg havi tí onga viðmerking til, at Løgmansskrivstovan sendi starvsfólkinum ætlaðu avgerðina til viðmerkingar.*

*Av tí at skjølini í starvsfólkamálinum og avgerðin í innlitsmálinum ikki lógu í málinum, sum upprunaliga varð latið mær, hevði eg í fyrsta umfari ikki møguleika at viðgera avgerðina í málinum. Eg heitti tískil á Løgmansskrivstovuna um at senda mær skjølini í málinum.*

*Eftir at hava lisið øll skjølini í málinum kann eg staðfesta, at Løgmansskrivstovan veitti innlit í øll skjølini í málinum við undantaki av trimum innanhýsis fundar-frágreiðingum, jbr. § 7 í innlitslógini. Eg havi onga viðmerking til avgreiðsluna av málinum.*

<u>Mál nr. 110</u>
Tann 17. januar 2013 biður journalistur um innlit í fráfaringaravtaluna, sum varð gjørd við ein fyrrverandi aðalstjóra. Harumframt verður biðið um innlit í uppsagnarskrivið og setanaravtaluna. Tann 23. januar 2013 sendir Løgmansskrivstovan, eftir at hava kunnað fyrrverandi aðalstjóran um innlitsáheitanina, journalistinum skjølini í málinum (eingin fráfaringaraavtala varð gjørd, men tó var farin fram ein starvsflyting), herímillum eina frágreiðing frá einum innanhýsis fundi um málið.

***Viðmerking:** Onga viðmerking. Tó kann staðfestast, at givið verður meirinnlit í eina innanhýsis fundarfrágreiðing.*

<u>Mál nr. 111</u>
14. desember 2012 biður borgari um innlit í samskiftið millum løgmann og starvsfólk í einum aðalráði um umsitingina av einum ávísum málsøki. Løgmansskrivstovan svarar sama dag, at løgmaður ikki hevur móttikið nakra klagu um handfaringina av málsøkinum frá embætisfólkunum.

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

***Onga viðmerking.***

Mál nr. 112, 113, 114

*Málini snúgva seg um innlit í málið um at avtaka Landsbankan. Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt av hesum málum sum vanligt klagumál. Víst verður til LUM 201300006.*

Mál nr. 115

*Málið snýr seg um innlit í málið um fullveldissamráðingarnar. Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt mál um hetta sama sum vanligt klagumál. Víst verður til LUM 201000094.*

Mál nr. 116

Tann 5. september 2012 biður journalistur um innlit í samskiftið millum landsstýrið og donsku stjórnina seinasta árið um føroyskan limaskap í WTO. 7. september 2012 sýtir Løgmansskrivstovan fyri at lata innlit í málið. Grundgevingin var m.a. soljóðandi:

> "Samskiftið seinasta árið snýr seg í høvuðsheitum um eitt uppskot til løgfrøðiligt upprit frá danska uttanríkisráðnum, ið varð sent føroysku uttanríkistænastuni til viðmerkingar í fjør, og okkara svarskriv, ið varð latið danska uttanríkisráðnum í sambandi við ein fund 31. mai 2012 og formliga sent eftir fundin. Avtalað er, at danska uttanríkisráðið arbeiðir víðari, m.a. við støði í okkara svarskrivi, fyri at evna til teirra endaliga upprit.
>
> Upplýsast kann, at WTO verður á skránni á fundinum millum løgmann og danska utanríkisráðharran, tá ið teir báðir hittast á fundi tann 13. september.
>
> Vísandi til § 13, stk. 1, nr. 2, t.e. at rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi uttanríkispolitiskum áhugamálum, verður innlit ikki latið í hesi skjølini nú."

***Viðmerking:***

*§ 13, stk. 1, nr. 2 og 6 í innlitslógini eru soljóðandi:*

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

*"**§ 13.** Ræ(tturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi*

*...*

*2) uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,*

*...*

*6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið."*

*Sambært grundgevingini hjá Løgmansskrivstovuni snýr málið seg um, at føroyskir og danskir myndugleikar samskifta um eitt uppskot til eitt løgfrøðiligt upprit. Eg havi havt høvi at lesa skjølini í málinum, og samskiftið millum føroysku og donsku myndugleikarnar snýr seg í høvuðsheitum um møguleikan fyri føroyskum limaskapi í WTO.*

*Í mínum fyribils viðmerkingum skrivaði eg soleiðis til Løgmansskrivstovuna: Av tí at talan er um samskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar (innan fyri ríkisfelagsskapin) dugi eg ikki at síggja, at grundgevingin um, at neyðugt er at verja munandi umhugsni viðvíkjandi uttanríkispolitiskum áhugamálum, herundir viðurskiftini við m.a. aðrar millumtjóða stovnar, kann brúkast til at sýta innlit í málið. Eg fari í hesum sambandi eisini at vísa á niðurstøðu mína í LUM 14/00051, sum snúði seg um at sýta innlit í eitt skjal í gerðarrættarmáli móti ES.*

*Løgmansskrivstovan hevur í sínum viðmerkingum gjørt greitt, at hon ikki er samd við umboðsmannin í, at samskiftið ikki kann verða undantikið innliti eftir § 13, stk. 1, nr. 2. Løgmansskrivstovan metir, at avgerandi fyri, um samskiftið millum Uttanríkistænastuna og danska Uttanríkisráðið kann undantakast eftir § 13, stk. 1, nr. 2 eigur at verða ávirkað av, um talan er um eitt yvirtikið málsøki, og hvørt Danmark hevur latið ES samsvarandi málsøki. Eg dugi ikki at síggja, at hetta er viðkomandi í ítøkiliga málinum um møguligan føroyskan limaskap í WTO.*

*Í mínum fyribils viðmerkingum mælti eg eisini Løgmanskrivstovuni til at viðgera, um innlit kundi verða sýtt í samskiftið vísandi til § 13, stk. 1, nr. 6. Eg vísti í hesum sambandi til atlitið at politisku avgerðargongdini, og at uppritið, sum samskift varð um, ikki var endaligt.*

*Løgmansskrivstovan sæst ikki í sínum viðmerkingum at hava tikið støðu til, um samskiftið kann verða undantikið eftir § 13, stk. 1, nr. 6. Løgmansskrivstovan vísir tó á, at skjølini í málinum framvegis skulu vera grundarlag undir samráðingum*

*millum landsstýrið og donsku stjórnina um føroyskan limaskap í WTO. Vísandi til hetta haldi eg fast við, at skjølini kunnu ikki undantakast innlit við heimild í § 13, stk. 1, nr. 2, men at treytin fyri at undantaka tey eftir § 13, stk. 1, nr. 6 er lokin.*

Mál nr. 117

Tann 24. oktober 2012 biður journalistur um innlit í tilmælið hjá setanarnevndunum um setan av aðalstjórum í Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum, eins og biðið verður um upplýsingar um, hvørjir limir vóru í setanarnevndunum. Løgmansskrivstovan svarar dagin eftir, at innlit verður ikki givið í setanarmál vísandi til § 2, stk. 1 í innlitslógini. Løgmansskrivstovan upplýsir tó, hvør mannaði setanarnevndirnar.

***Viðmerking:***

*Víst verður til viðgerðina av máli nr. 35 um innlit í starvssetanarmál. Staðfestast kann, at Løgmansskrivstovan gevur innlit í nøvnini á teimum, ið mannaðu setanarnevndirnar, eftir regluni um meirinnlit.*

Mál nr. 118

Tann 4. februar 2013 søkir tíðindaportalur um innlit í uppmøting og tímanýtslu hjá einum starvsfólki á Løgmansskrivstovuni. Tann 13. februar 2013 sýtir Løgmansskrivstovan fyri at veita innlit vísandi til § 5, stk. 2 í innlitslógini.

***Viðmerking:***

*Sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini fevnir rætturin til innlit ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har edv verður nýtt, burtursæð frá skrásetingum viðvíkjandi skjølunum í viðkomandi máli (skjalayvirlitið). Tað vil siga, at rætturin til innlit fevnir bert um innlit í skjøl – ikki í elektroniskar databasur. Vísandi til at uppmøting og tímanýtsla hjá starvsfólki á Løgmansskrivstovuni verður skrásett í eini elektroniskari skipan, havi eg onga viðmerking til grundgevingina fyri at sýta innlitsáheitanini.*